

# Fyrimunir og vansar *við* samanlegging

**Fámjins** *kommuna*

**Hvalbiar** *kommuna*

**Tvøroyrar** *kommuna*

**Arbeiðsbólkur** *2024*

1. **Inngangur** 5
2. **Samandráttur og niðurstøða** 7
3. **Karmar fyri kommunala bygnaðin í Føroyum** 10
4. **Lýsing av verandi kommunum** 13
   4.1. Tvøroyrar kommuna 13
   4.2. Hvalbiar kommuna 14
   4.3. Fámjins kommuna 15
   4.4. Samstarv millum kommunurnar 15
5. **Fíggjarstøðan í kommunum** 16
   5.1. Inntøkur og skattaprosent 16
   5.2. Útreiðslur og løgur 19
   5.3. Skuld 20
6. **Fólkatalið í kommunum** 22
   6.1. Framrokning av fólkatalinum 27
   6.2. Arbeiðsmarknaðurin í Suðuroynni 28
7. **Barnaansing í kommunum** 32
8. **Skúlarnir í kommunum** 33
   8.1. Skúlin í Tvøroyrar kommuni 33
   8.2. Fámjins skúli 34
   8.3. Hvalbiar skúli 35
9. **Bú- og heimatænastan í Suðuroynni** 36
   9.1. Eldrabústaðir 36
   9.2. Tænastur 38
   9.3. Starvsfólk í Bú- og heimastænastuni 38
   9.4. Fígging av Bú- og heimatænastuni 39
   9.5. Framtíðartørvurin á eldraøkinum 42
10. **Barnaverndartænastan í Suðuroynni** 44
   10.1. Fígging og kostnaður av barnavernd 44
11. **Avbjóðingar hjá verandi kommunum og Suðuroynni** 46
12. **Hvussu kann ein samanlegging fremjast?** 48
13. **Nýggja kommunan í norðaru helvt** 50
   13.1. Fíggjarstøðan hjá nýggju kommununi 50
   13.2. Umboðanin í nýggju kommununi 51
      *Umboðanin í samstørvunum í Bú- og heimatænastuni og barnaverndini* 52
      *Umboðan í interkommunalum felagsskapum* 53
   13.3. Umsitingin í nýggju kommununi 53
   13.4. Skipan av skúlunum í nýggju kommununi 54
      *Gongdin í næmingatalinum* 54
      *Tilmæli um ein nýggjan skúlabygnað* 56
   13.5. Nýggja kommunan í samstarvinum um Bú- og heimatænastuna 57
      *Avbjóðingar í samstarvinum um Bú- og heimatænastuna mugu loysast* 58
      *Valdsbýti* 58
      *Ognarviðurskifti* 59
      *Fíggingarleistur* 59
   13.6. Nýggja kommunan í samstarvinum um barnaverndartænastuna í Suðuroy 60
14. **Niðurstøða** 61
**Bókmentir** 65


Hvalbiar
kommuna
Tvøroyrar
kommuna
Fámjins
kommuna

# 1. Inngangur

Spurningurin um kommunusamanlegging av kommunum í Suðuroynni er ikki nýggjur og hevur verið viðgjørdur politiskt í eini 20-25 ár. Stóri spurningurin í Suðuroynni hevur verið, um kommunurnar skulu leggjast saman í eina ella tvær kommunur. Í 2005 vórðu Tvøroyrar og Vágs kommuna samdar um at fara undir realitetssamráðingar um kommunusamanlegging treytað av, at miðnámsskúlin varð bygdur í Vági og eitt ellis- og røktarheim á Tvøroyri. Tá treytirnar ikki vórðu gingnar á møti, vórðu realitetssamráðingarnar av ongum, og síðani eru stig ikki tikin til at leggja kommunurnar saman.

Bý- og bygdaráðini á Tvøroyri, í Hvalba og Fámjin samtyktu í 2023 at seta ein arbeiðsbólk fyri at lýsa fyrimunir og vansar við eini kommunusamanlegging.

### *Í arbeiðsbólkinum sita:*

**Róin Schrøter**, *formaður, umboðandi Hvalbiar kommunu*
**Ólavur Rasmussen**, *skrivari, umboðandi Hvalbiar kommunu*
**Doris Bjarkhamar**, *næstforkvinna, umboðandi Tvøroyrar kommunu*
**Herit Albinus**, *umboðandi Tvøroyrar kommunu*
**Eyðdis Ellendersen**, *umboðandi Fámjins kommunu*
**Niels J. Nielsen**, *umboðandi Fámjins kommunu*

### *Arbeiðsbólkurin hevur fingið soljóðandi arbeiðssetning:*

- **At arbeiðsbólkurin fremur eina lýsing av hvørjari kommunu sær, við m.a. lýsing av fyrimunum og vansum við sjálvbodnari kommunusamanlegging.**
- **At arbeiðsbólkurin orðar eina niðurstøðu, ið verður løgd til støðutakan hjá hvørjari kommunu sær innan 01.02.2024.**

Sjálvur arbeiðssetningurin er opin og breiður. Í tilfarinum, sum arbeiðsbólkurin hevur fingið saman við arbeiðssetninginum, verður m.a. víst á, at tað eru nógvar góðar grundir til at skipa samfelagið við stórum og sterkum kommunalum eindum. Tað snýr seg um at hava búskaparliga og umsitingarliga burðardyggar eindir, sum kunnu geva borgarunum bestu tænasturnar og hava betri møguleika at røkja uppgávurnar í nærumhvørvinum. Eisini verður víst á, at fyri at fáa eitt demokrati at virka nøktandi er neyðugt við ávísum størri fólkagrundarlagi í einari eind. Hetta skapar dynamikk og virkar mennandi fyri fólkaræðið. Fleiri fólk fáa høvi at taka lut og fáa ávirkan á viðurskiftini í lokaløkinum, og veljarin fær fleiri valevni at velja ímillum í einari størri kommunalari eind.

### *Við støði í hesum og øðrum viðurskiftum, sum ofta verða tikin fram, tá spurningurin um kommunusamanlegging verður viðgjørdur, hevur arbeiðsbólkurin valt at viðgera fylgjandi viðurskifti:*

- **Fíggjarstøðuna í kommununi**
- **Umboðanin í kommununi**
- **Fyrisitingin í kommununi**

Arbeiðssetningurin leggur upp til, at arbeiðsbólkurin skal lýsa fyrimunir og vansar við sjálvbodnari kommunusamanlegging fyri hvørja einstaka kommunu.

Arbeiðsbólkurin metir, at spurningurin í størri mun eigur at verða viðgjørdur í einum størri og breiðari samanhangi. Vísandi til avbjóðingarnar sum Føroyar og serliga Suðuroyggin hava viðvíkjandi haldførinum, hevur arbeiðsbólkurin valt at lýsa tær avbjóðingar, sum Suðuroyggin hevur viðv. fólkasamansetingini bæði nú og frameftir.

Arbeiðsbólkurin viðger tó ikki spurningin um samanlegging av øllum teimum sjey kommununum í Suðuroynni, tí hetta er uttan fyri arbeiðssetningin, sum bý- og bygdaráðini hava samtykt og latið arbeiðsbólkinum.

Arbeiðsbólkurin fyriheldur seg heldur ikki til, hvussu tilgongdin hevur verið fram til, at arbeiðsbólkurin varð settur og arbeiðssetningurin latin bólkinum.

Tó verða samstørvini um barnavernd, bú- og heimatænastu og skúla, sum eru millum allar kommunurnar, viðgjørd, tí hesi kunnu hava avgerandi týdning fyri spurningin um fyrimunir og vansar við at leggja tær tríggjar kommunurnar saman.

Í fyrsta parti av álitinum verða kommunurnar í verandi líki lýstar við atliti til m.a. fólkatal, fíggjarstøðu, og skipan av bý- og bygdarráðum og umsitingarliga bygnaðinum. Eisini verða samstørv, sum kommunurnar hava sínámillum og við aðrar kommunur í Suðuroynni og Føroyum sum heild, lýst. Serligur dentur er lagdur á samstarvið um Bú- og heimatænastuna. Harumframt hevur arbeiðsbólkurin valt at lýsa skúlarnir í teim trimum kommununum.

Seinni partur av álitinum viðger fíggjarstøðuna, umboðanina og fyrisitingina í einari samanlagdari kommunu og hvussu avbjóðingarnar við samstarvinum um Bú- og heimatænastuna og skúlarnar kunnu loysast.

At enda verður tikið saman um fyrimunir og vansar, og ein niðurstøða um samanlegging verður gjørd.

Arbeiðsbólkurin hevur havt fundir við Sunda kommunu, Eysturkommunu, formannin í kommunufelagnum, stjóran í kommunufelagnum, borgarstjórarnar í norðaru helvt í Suðuroynni, leiðslurnar í skúlunum í Hvalba og á Tvøroyri, Undirvísingarstýrið og fyrrverandi stjóran í Bú- og heimatænastuni.

# 2. Samandráttur og niðurstøða

Spurningurin um fyrimunir og vansar við kommunusamanlegging skal síggjast í ljósinum av støðuni hjá Suðuroynni, bæði sum gongdin hevur verið, er og framtíðarútlit.

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at Tvøroyrar kommuna, Hvalbiar kommuna og Fámjins kommuna eiga at leggja saman.

Haldføristrupulleikin er størri í Suðuroynni enn í restini av landinum. Meðan Føroyar hava havt ein stóran fólkavøkstur seinastu 10 árini, er fólkatalið minkað í Suðuroynni. Minkingin er grundað á fólkafráflyting og lægri burðartal. Um samanborið verður við restina av landinum, eru tey eldru ein lutfalsliga størri partur av fólkinum, meðan tey í arbeiðsførum aldri og børnini eru lutfalsliga færri í tali.

Framtíðarútlitini fyri kommunurnar Fámjin, Hvalba og Tvøroyri sýna eina støðuga minking í fólkatalinum.

Framrokningar fram til 2050 vísa, at fólkatalið í hesum trimum kommununum minkar úr umleið 2500 fólkum til umleið 2050 fólk. Treytin fyri, at kommunur leggja saman, er m.a., at tað eru 2000 íbúgvar í nýggju kommununi.

Samstundis vísa framrokningar eina øking í aldursbólkinum 80+ ár úr 6% av fólkatalinum upp í 13% av fólkatalinum. Hetta hevur við sær, at tørvurin á tænastum á eldraøkinum verður hægri, enn hann er í dag. Eftirspurningurin eftir búplássum og heimatænastum í norðaru helvt økist væntandi við 20% komandi 11 árini.

Kommunurnar í Suðuroynni eru í tvungnum samstarvi um eldraøkið og barnavernd, tí treytin er, at 3000 fólk skulu vera í samstørvum, sum umsita ávikavist barnavernd og heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Eingin fíggjarætlan hevur verið fyri Bú- og heimatænastuna í Suðuroynni, síðan eldraøkið varð lagt út til kommunurnar. Arbeiðsbólkurin mælir staðiliga til, at hetta og aðrar avbjóðingar í samstarvinum verða loystar uttan mun, um kommunusamanleggingin verður framd ella ikki.

Í 2022 vóru samlaðu útreiðslurnar til eldraøkið í Suðuroynni 65 mió. kr. Tær tríggjar kommunurnar í norðaru helvt rinda 53% av hesum útreiðslum. Umboðanin í stýrinum er 4 av 9 limum, t.e. 44%. Ein samanlegging hevur við sær, at henda umboðanin minkar til tríggjar av átta limum, t.e. 37,5%.

Dagstovnaøkið í norðaru helvt er í dag væl útbygt. Nýggjur barnagarður er í Hvalba, og nýútbygdur barnagarður er í Trongisvági.

Fallandi barnatalið í teimum trimum kommunum verður ein avbjóðing fyri fólkaskúlarnar í kommununi, og broytingar mugu fremjast uttan mun til, um kommunurnar leggja saman ella ikki. Tað eru í dag tríggir skúlar, og kommunalu útreiðslurnar til skúlarnar í 2022 vóru umleið 13 mió. kr samanlagt. Framskrivingar benda á, at barnatalið fer at minka við 12% komandi 15 árini.

Samstarv er í dag millum skúlarnar, og í framtíðini er neyðugt, at skúlarnir so ella so verða lagdir saman. Hetta merkir ikki, at skúlarnir verða niðurlagdir, men at árgangir í ymiskum kommunum verða samlaðir í ymisku skúlunum.

Samlaðu útreiðslurnar til barnaverndartænastuna í Suðuroynni vóru 8,5 mió. kr. í 2022. Samanlagt rindaðu tær tríggjar kommunurnar í norðaru helvt 54% av hesi upphædd. Umboðanin í samstarvsnevndini er tríggir av sjey limum, svarandi til 43%. Verða kommunurnar lagdar saman, verður umboðanin ein av fimm limum, sum svarar til einans 20%.

Galdandi lóggáva um samstarv um barnavernd og Bú- og heimatænastuna tryggjar sostatt ikki, at samsvar er millum gjald og vald, og hetta kann verða ein forðing fyri samanlegging av kommunum.

Fíggjarstøðan hjá teimum trimum kommununum er rættiliga lík, og er hetta ein fyrimunur fyri eina samanlegging. Skattaprosentið í Fámjins kommunu er tó væl lægri enn í hinum báðum kommununum. Vaksandi útreiðslurnar til eldraøkið hava verið tyngjandi fyri Fámjins kommunu, og sannlíkt er, at skattaprosentið í Fámjin fer at hækka uttan mun til møguliga samanlegging.

Ein álíkning hjá eini samanlagdari kommunu svarar til oman fyri 150 mió. kr. í 2022 tølum. Hetta er við nýggja skuldarmarkinum, sum er ásett pr. 1. januar 2024. Í eini samanlagdari kommunu verður munurin millum álíkning og skuld næstan 100 mió. kr. í 2022 tølum. Møguleikin fyri at gera stórar íløgur er tí munandi betri í nýggju kommununi.

Nettoskuldin pr. borgara verður 22,1 túsund kr. í samanløgdu kommununi, um 2022 tøl verða nýtt. Hetta er á leið tað sama sum í Tvøroyrar- og Hvalbiar kommunum í dag og nakað lægri enn í Fámjin.

Ein nýggj kommuna skal smb. kommunustýrislógini hava millum 7 og 17 limir. Samlað eru í dag 17 kommunustýrislimir í teimum trimum kommununum, og samsýningarnar eru á leið 2,4 mió. kr., umframt borgarstjóralønirnar. Flestu kommunur, sum kunnu samanberast við nýggju kommununa, hava 11 limir, tó hevur Eysturkommuna 9.

Verður nýggja kommunan mannað við 11 limum, svarar tað til 177 atkvøður pr. býráðslim. Verða 9 limir, svarar hetta til 216 atkvøður pr. býráðslim. Í báðum førum skuldu útreiðslurnar til kommunustýrislimirnar verið lægri enn tær eru í dag við 17 kommunustýrislimum.

Í dag eru 195 atkvøður fyri hvønn valdan býráðslim í Tvøroyrar kommunu, 72 atkvøður í Hvalbiar kommunu og 24 atkvøður í Fámjins kommunu.

Kommunustýrislógin heimilar at hava staðbundnar nevndir, sum kunnu tryggja, at lokal áhugamál verða hoyrd viðvíkjandi staðbundnum viðurskiftum. Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis, at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan.

Sum er, hava Fámjins- og Hvalbiar kommunur avmarkaða umsiting, meðan Tvøroyrar kommuna hevur eina fíggjardeild, eina tekniska deild og eina trivnaðardeild. Í Tvøroyrar kommunu er ein kommunustjóri í fullum starvi, meðan í Hvalbiar- og Fámjins kommunum hava tey kommunuskrivarar.

Ein samanløgd kommuna eigur at hava eina felags umsiting við fulltíðarsettum kommunustjóra.

Ein sterk, faklig felags umsiting er ein fyrimunur fyri rættartrygdina hjá borgarunum. Hinvegin kann ein vansi við eini felags fyrisiting vera størri fjarstøða til borgaran, og at leiðin til kommununa verður truplari.

Tað eru bara samdar kommunur, sum kunnu leggja saman. Ein samanleggingartilgongd av teimum trimum kommununum eigur einans at fara í gongd, um bý- og bygdaráðslimir samtykkja tað, ganga á odda og seta neyðugu orkuna av fyri at fremja málið.

Fólkaatkvøða um samanlegging er ikki lógarkrav og er einans vegleiðandi. Um fólkaatkvøða verður, er neyðugt, at tað er greitt fyri borgarunum, hvat atkvøðast skal um.

Eitt ítøkiligt uppskot um ein samanleggingarsáttmála skal fyriliggja áðrenn fólkaatkvøðuna um samanlegging, so borgarin fær innlit í, hvussu ein nýggj kommuna verður skipað, áðrenn støða verður tikin.

Øll tøl vísa, at Suðuroyggin er í eini truplari støðu, sum bara verður verri, um einki verður gjørt. Greitt er, at landið má gera átøk fyri at loysa framtíðar avbjóðingar hjá kommununum.

Kommunurnar mugu tó eisini taka ábyrgd av álvarsligu støðuni og gera sítt til at standa ímóti avbjóðingunum, sum longu eru og fara at koma.

Við støði í omanfyri lýsta, er arbeiðsbólkurin samdur um, at tíðin er komin til at taka stigið og leggja kommunurnar saman. Ein kommuna verður ein sterkari, fíggjarlig og fyrisitingarlig eind enn tær tríggjar kommunurnar hvør sær.

Arbeiðsbólkurin ásannar, at valdsbýtið í samstørvunum millum allar kommunurnar í Suðuroynni á eldraøkinum og barnaverndarøkinum verður verri eftir eina samanlegging av kommununum og eigur henda avbjóðingin at verða loyst.

Ein samanlegging loysir ikki allar avbjóðingar í Suðuroynni, men vísir ein vilja til at taka neyðug stig og líta frameftir.

# 3. Karmar fyri kommunala bygnaðin í Føroyum

Skiftandi landsstýri, bý- og bygdarráð og fakfólk hava støðugt víst á, at tað er ein trupulleiki fyri føroyska samfelagið, at tað eru so nógvar kommunur í Føroyum.

Í 1866 var Tórshavnar kommuna skipað við lóg sum tann fyrsta í Føroyum, og í 1872 varð restin av Føroyum skipað í 7 landkommunur við 39 sóknum. Hvør sókn í kommununi var ein sjálvstøðug fíggjarlig eind, sum kundi gerast sjálvstøðug kommuna, um sóknin ynskti tað. Í 1972 vóru allar sóknirnar vorðnar sjálvstøðugar kommunur, og onkrar av sóknunum vóru eisini býttar upp, so at ikki færri enn 50 kommunur vóru í Føroyum. Í 1972 kom nýggj kommunulóg, sum forðaði fyri, at kommunur kundu fara sundur, og lógin legði eisini upp til, at kommunalu eindirnar skuldu gerast størri.

Fyrst í nítiárunum var spurningurin um kommunala bygnaðin aftur á dagsskránni. Í kjalarvørrinum av kreppuárunum varð spurningur settur við, um nógvu smáu kommunurnar fíggjarliga og umsitingarliga vóru førar fyri at loysa tær uppgávur, sum tær skuldu, á skynsaman hátt.

Kommununevnd varð sett og lat úr hondum álit, har mælt varð til nýggjan bygnað. Kommununevndin mælti til, at kommunali bygnaðurin varð broyttur soleiðis, at tað skuldu verða millum sjey og níggju kommunalar eindir í Føroyum, og at uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur skuldi gerast greiðari.

Nevndin gjørdi eitt uppskot um eina kommunustýrislóg, sum skuldi skipa stýrisskipanarligu viðurskiftini í kommununum og eitt uppskot um lóg um samanlegging og sundurbýti í kommunur.

Kommununevndin mælti til, at kommunurnar í Suðuroynni vórðu lagdar saman í eina ella tvær kommunur alt eftir, um samanleggingin var sjálvboðin ella varð framd við lóg. Lagt varð upp til, at táverandi kommunur skuldu fáa eitt ávíst skotbráð til at leggja saman sjálvboðið, og um ikki lagt varð saman sjálvboðið, varð mælt til, at Løgtingið skuldi leggja kommunurnar saman við lóg.

Politisk semja var tó ikki um at leggja kommunurnar saman við lóg.

Ístaðin samtykti Løgtingið í 2001 og í 2007 løgtingslóg um sjálvbodna kommunusamanlegging, sum ásetti, hvørji krøv eru fyri, hvørjar kommunur kunnu leggja saman og hvussu. Tað er m.a. krav, at kommunurnar skulu í minsta lagi hava 2000 íbúgvar.

Nakrar samanleggingar hava verið, síðani lógin varð samtykt, men helst hava løgtingslimir væntað, at fleiri kommunur fóru at leggja saman, tí ætlanin var, at fleiri av teim stóru vælferðarøkjunum skuldu flytast frá landi til kommunurnar at umsita.

Í 2009 kom enn eitt fakligt tilmæli um at leggja kommunurnar saman í sjey til níggju eindir. Bólkurin mælti til, at Suðuroyggin varð løgd saman í eina eind við fylgjandi grundgeving:

> ***Suðuroyggin hevði kunnað verið býtt í tvær eindir, sum báðar hvør í sínum lagi høvdu lokið tey atlit, ið nevndin nýtir, men talan er um eina oyggj, sum við síni frástøðu frá meginøkinum er útjaðari í landinum og hevur verið fyri stórari afturgongd. Fyri at stuðla sum mest undir eina tilgongd, sum kann virka ímóti gongdini, sum hevur verið, er neyðugt, at Suðuroyggin verður skipað sum ein staðbundin eind. Tí mælir nevndin til, at Suðuroyggin verður løgd saman í eina kommunu.***
>
> *Kommunala umskipanarnevndin, 2009, s.17*

Hóast kommununevndin upprunaliga mælti til, at bara uppgávur, sum kommunurnar kundu umsita sjálvstøðugt, vórðu lagdar til kommunurnar at umsita, eru alsamt fleiri stórar og tungar uppgávur fluttar frá landi til kommunur at umsita gjøgnum árini.

Í 2000 varð dagstovnaøkið flutt frá landinum til kommunurnar. Tað hevði víst seg, at kommunurnar í fleiri ár høvdu havt trupult at nøkta alsamt vaksandi tørvin á ansingarplássum, og landið hevði ikki fíggjarorku til at fylgja við neyðugu útbyggingini av økinum. Kommunurnar ynsktu at yvirtaka ábyrgdina av økinum, og fakliga varð mælt til, at hetta varð framt. Løgtingið samtykti, at frá 1. juli 2000 fingu kommunurnar ábyrgd av dagstovnaøkinum.

Í 2006 varð barnaverndarøkið flutt til kommunurnar at umsita, og nøkur ár seinni varð barnaverndarøkið í Suðuroynni skipað í eitt tvungið samstarv. Sambært almennum viðmerkingum til uppskot um barnaverndarlógina varð víst á, at táverandi landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum var av teirri áskoðan, at barnaverndarøkið var ov trupult og viðkvæmt at leggja út til tær heilt smáu kommunurnar at umsita. Økið skuldi skipast í størri eindir, soleiðis at tað so langt sum gjørligt kundi sleppast undan ógegni í barnaverndarnevndunum, so at rættartrygdin hjá børnum varð tryggjað á ein nøktandi hátt.

Samstarvsøkini skulu sambært barnaverndarlógini skipast samsvarandi eindunum í lógini um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur.

Samstarvsøki kunnu samstarva um felags barnaverndarnevnd, og samstarvsøkini skulu tá verða samfeld landafrøðiliga ella samferðsluliga. Tó kann landsstýrismaðurin loyva, at fleiri barnaverndarnevndir verða skipaðar innan einstøku samstarvsøkini, treytað av, at tað í minsta lagi eru 3.000 íbúgvar fyri hvørja barnaverndarnevnd.

Kommunurnar í Suðuroynni velja eitt umboð fyri hvørja kommunu í eina samstarvsnevnd, sum virkar sum stýri fyri barnarverndarøkið. Samstarvsnevndin skipar umsitingina av barnaverndarøkinum. Harumframt velur hvørt kommustýri eitt umboð í eina barnaverndarnevnd. Barnaverndarnevndin er sett saman av fólki, sum hevur eina miðallanga útbúgving.

Í 2014 samtykti Løgtingið, at kommunurnar skuldu umsita heimatænastu, eldrarøkt v.m. frá 1. januar 2015 at rokna. Samstundis samtykti Løgtingið, at kommunurnar skuldu skipa seg í kommunal samstarvsøki, ið hava til endamáls at umsita heimatænastu, eldrarøkt v.m. í avvarðandi kommunu. Løgtingið samtykti sostatt, at kommunurnar skuldu umsita eldraøkið, hóast ongar kommunusamanleggingar vórðu framdar.

Avgjørt varð, at kommunurnar skuldu samstarva um uppgávuna í eindum, sum taldu í minsta lagi 3000 íbúgvar, ið varð mett sum hóskandi minstakrav fyri, at eitt øki fíggjarliga er ment at veita haldgóða tænastu á eldraøkinum. Eldraøkið er eitt sera rakstrartungt málsøki, og er tað í sjálvum sær ein grundgeving fyri at hava lutfalsliga stór øki.

Tað er ásett í løgtingslóg, at kommunurnar í Suðuroynni skulu skipast sum eitt samstarvsøki. Undantøk kunnu gerast, um økini er landafrøðiliga og samferðsluliga samfeld, og samstarvsøkini skulu hava í minsta lagi 3000 íbúgvar. Kommunurnar fingu møguleika til sjálvar at skipa seg við samstarvsavtalum eftir nærri ásettum krøvum.

Samstarvsavtalurnar skuldu góðkennast av landstýrisfólkinum.

Fyri hvørt samstarvsøki skuldi eitt stýri veljast eftir kommunuval fyri valskeiðið, sum kommunustýrið situr. Stýrið velur sjálvt formann og næstformann. Ein av borgarstjórunum í samstarvinum skal vera formaður. Formaðurin skal áðrenn 1. september leggja uppskot til fíggjarætlan fyri stýrið. Stýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir. 1. viðgerð skal verða áðrenn 1. oktober, soleiðis at avleidda gjaldið hjá kommununum í samstarvinum kann takast við í fíggjarætlanarviðgerð teirra.

Landsstýriskvinnan í almannamálum ásetti sjálv samstarvsavtaluna fyri Suðuroynna, tí ongin sáttmáli var klárur til ásettu freistina.

Samanumtikið er tað ásett við lóg, at skulu kommunur leggja saman, skulu tað í minsta lagi vera 2000 íbúgvar, og tað er eisini lógarásett, at kommunur skulu samstarva um barnavernd og heimatænasta, eldrarøkt v.m. og hesi samstørv skulu í minsta lagi fevna um 3000 íbúgvar.



# 4. Lýsing av verandi kommunum

Í hesum kapitlinum verða tær tríggjar kommunurnar lýstar við atliti at fólkatali, fíggjarstøðu, tænastustøði, umframt skipan av bý- og bygdarráðum og umsitingum. Lýsingin verður síðani brúkt til at meta um, hvørjir fyrimunir og vansar eru við at leggja kommunurnar saman.

## 4.1. Tvøroyrar kommuna

Tvøroyrar kommuna fevnir um Tvøroyri, Froðba, Trongisvág, Ørðavík og Ørðavíkarlíð. Tvøroyrar kommuna er størsta kommuna í Suðuroynni.

Íbúgvaratalið í Tvøroyrar kommunu 1. juni 2023 var 1762 fólk, og svarar hetta til næstan 40 prosent av íbúgvunum í Suðuroynni. Tá fólkatalið á Tvøroyri var í hæddini í 1950-árunum, búðu fleiri enn 2100 fólk í kommununi. Í 1930-árunum búðu fleiri enn 8 prosent av føroyingum í Tvøroyrar kommunu, meðan tað í dag búgva á leið 3 prosent av øllum føroyingum í kommununi.

Býráðið hevur 7 limir. Føstu nevndirnar eru fíggjarnevndin, sosiala nevndin, tekniska nevndin, mentanarnevndin, vinnu- og havnanevndin, umframt trivnaðar- og umhvørvisnevndina. Nevndirnar hava allar tríggjar limir.

Á býráðsskrivstovuni starvast 9 fólk, umframt borgarstjóran. Fyrisitingin er skipað við einum kommunustjóra og trimum deildum, sum eru fíggjardeildin, tekniska deildin og trivnaðardeildin. Størsta deildin er tekniska deild, har leiðarin varar av 9 starvsfólkum. Tekniska deild fevnir um kirkjugarð, ruskpláss, svimjihøll, Tvøroyrar havn, Tvøroyrar sløkkilið og vatnveiting.

Samlaðu útreiðslurnar og løgurnar hjá kommununi í 2022 vóru 99 mió. kr.

Størsta útreiðslan var til eldrasamstarvið, har kommunan rindaði 23,3 mió. kr. hetta árið ella 13.318 kr. pr. borgara. Barnaansingin kostaði 13,4 mió. kr., sum svarar til 7.664 kr. pr íbúgva.

Til fyrisitingina vórðu brúktar 10,3 mió. kr., sum svarar til 5.866 kr. pr. íbúgva. Samsýningar o.a. til býráðslimir vóru 1,6 mió. kr. í 2022.

Til mentan og frítíð vórðu brúktar 10,2 mió. kr., sum er 5.845 kr. pr. íbúgva. Til fólkaskúlan brúkti kommunan 10,4 mió. kr., sum svarar til 5.935 kr. pr. íbúgva. Til teknisk mál vórðu brúktar 16,7 mió. kr., og svarar hetta til 9.543 kr. pr. íbúgva.

Skattaprosentið á Tvøroyri er 20,9 prosent, og barnafrádrátturin er 8.000 kr. Skattir og avgjøld pr. íbúgva liggja á sama støði sum miðal fyri alt landið. Hetta sama er galdandi fyri rakstur og íløgur netto pr. íbúgva.

Nettoskuldin pr. íbúgva hevur verið ein tann hægsta í landinum. Her kann sum dømi nevnast, at í 2000 høvdu Tvøroyrar- og Sands kommuna hægstu nettoskuldina pr. íbúgva. Hetta er tó ikki galdandi í dag, tó at skuldin pr. íbúgva enn liggur nakað oman fyri støðið fyri alt landið.

Fíggjarstøðan er nærri viðgjørd í kap. 5.

Á Tvøroyri eru nógv ítróttar- og mentanartilboð til borgarar í øllum aldri. Kommunan hevur seinastu árini gjørt íløgur fyri at skapa góðar karmar fyri ítróttar-, frítíðar- og mentanartilboðini í kommununi. Harumframt stuðlar kommunan ymiskum felagsskapum. Sjálvboðin skipa fyri nógvum tiltøkum, sum kommunan eisini stuðlar.

## 4.2. Hvalbiar kommuna

Hvalbiar kommuna fevnir um Sandvík og Hvalba. Hvalba er aldargomul bygd og størsta markatalsbygd í Føroyum. Í fólkateljingini í 1801 var Hvalba største bygd í Føroyum, einans Havnin var størri. Í dag er Hvalbiar kommuna triðstørsta kommunan í Suðuroynni. Íbúgvaratalið 1. juni 2023 var 666. Tá fólkatalið var í hæddini í 1950-unum og 1990-unum, vórðu fleiri enn 850 fólk í sóknini.

Inntøkan hevur verið vaksandi frá 2015 til 2022, frá 21 mió. til 27 mió. Skattaprosentið hevur ligið stabilt um 20% og er í 2024 20,4%. Barnafrádrátturin er 6.500 kr. í 2024. Skattir og avgjøld pr. íbúgva hava flestu árini verið lægri enn miðal fyri alt landið, men í 2022 vóru hesi á sama støði sum miðal fyri alt landið. Rakstur og íløgur netto pr. íbúgva vóru nakað lægri í 2022 enn miðal fyri alt landið. Árligu sveiggini hava tó verið stór.

Bygdarráðið er mannað við 7 limum. Borgarstjórin situr hálva tíð, og umsitingin hevur 1,5 starvsfólk.

Kommunalu nevndirnar eru fíggjarnevnd, teknisk nevnd, trivnaðarnevnd og vega- og havnanevnd.

Roknskapurin fyri 2022 vísti eina samlaða útreiðslu og løgu á 31 mió. Størsta útreiðslan var til eldrasamstarvið, sum kostaði 8,9 mió. kr. ella 13.357 kr. pr. íbúgva. Barnaansing kostaði 6,3 mió. kr. ella 9.518 kr. pr. íbúgva.

Útreiðslur til fyrisiting var 2,2 mió. kr., sum svarar til 3.341 kr. pr. borgara. Av útreiðslunum til fyrisitingina, vóru 800.000 kr. í samsýningum til kommunustýrislimir.

Útreiðslur til mentan og frítíð vóru 1,6 mió. kr. í 2022, t.e. 2.327 kr pr. borgara. Útreiðslur til teknisk mál vóru 2,8 mió. kr., sum svarar til 4.240 kr. pr. íbúgva. Hetta er lægri enn á Tvøroyri og munandi lægri enn í Fámjin í 2022. Fólkaskúlin kostaði 2,4 mió. kr. í 2022, sum svarar til 3.578 kr. pr. íbúgva.

Fíggjarstøðan er nærri viðgjørd í kap. 5.

Hvalbiar kommuna stuðlar eisini frítíðar- og mentanartilboðum í sóknini og skipað verður fyri eini røð av trivnaðartiltøkum.



## 4.3. Fámjins kommuna

Fámjins kommuna er minsta kommuna í Suðuroynni. Um ártúsundskiftið lá fólkatalið beint oman fyri 100. Umleið 2014 fór fólkatalið niður um 100, og fall skjótt niður ímóti 80, har tað so hevur ligið seinastu 7-8 árini. Hægsta fólkatalið í Fámjins kommunu varð skrásett í 1950, tá fólkatalið var 228.

Inntøkurnar frá kommunuskattinum liggja um 2,8 mió. kr.

Skattaprosentið í Fámjin var 19% til 2020, tá tað varð lækkað til 16%, sum tað er í dag. Barnafrádrátturin er 8000 kr. í 2024.

Fámjins kommuna er sambært lóg noydd einans at hava tríggjar bygdarráðslimir. Av tí at so fáir bygdarráðslimir eru, er kommunan ikki nevndarstýrd, men allar avgerðir verða tiknar beinleiðis av kommunustýrinum á almennum bygdarráðsfundi.

Umframt borgarstjóran hevur kommunan ein skrivara í starvi uml. 1/5 tíð.

Samlaðu útreiðslurnar og løgurnar í 2022 vóru 5,6 mió. kr. Størsti parturin hetta árið fór til teknisk mál. Kommunan rindaði umleið 2,4 mió. kr. til teknisk mál í 2022, sum svarar til 30.063 kr. pr. íbúgva.

Eldraøkið kostaði kommununi 1,9 mió. kr., sum svarar til 23.937 kr. pr. íbúgva. Fámjins kommuna brúkti í 2022 munandi meira pening pr. íbúgva til eldraøkið og teknisk mál enn hinar báðar kommunurnar.

Til fólkaskúlan vóru nýttar 206 tkr., sum er 2.575,- kr. pr. íbúgva. Útreiðslur til frítíð og mentan vóru 87 tkr., svarandi til 1.101 kr. pr. íbúgva. Fyrisitingin kostaði 450.000 kr., sum svarar til 5.696 kr. pr. íbúgva. Harav vóru 41.000 kr samsýningar til kommunustýrislimir. Í kap. 5 verður fíggjarstøðan nærri viðgjørd.

Skipað verður fyri ymiskum trivnaðartiltøkum, sum hava týdning fyri felagsskapin í bygdini. Kommunan stuðlar eisini ymiskum tiltøkum í bygdini. Harumframt brúka fólk í Fámjin eisini ítróttar-, frítíðar- og mentanartilboðini, sum eru á Tvøroyri. Fámjins kommuna stuðlar tó eisini hesum tilboðum á Tvøroyri.

## 4.4. Samstarv millum kommunurnar

Søguliga eru Hvalbiar- Fámjins- og Tvøroyrar kommunur vanar at samstarva.

Í dag fevnir samstarvið um tilbúgving, tannarøkt, skúlar og kommunulæknar. Harumframt samstarva Fámjins kommuna og Tvøroyrar kommuna um barnaansing.

Tannarøkt, tilbúgving og leiga av hølum í sambandi við kommunulæknarnar er rindað eftir fólkatalinum.

Fámjins kommuna rindar pr. barn fyri barnaansing og skúlan.

Harumframt samstarva hesar tríggjar kommunurnar við hinar kommunurnar í oynni um barnavernd, eldraøki og líkbil. Barnaverndarøkið og eldraøkið verða lýst nærri seinni.

Kommunurnar eru eisini limir í interkommunalum felagsskapum og hava umboðan og atkvøðurætt. Interkommunalu felagsskapirnir eru Føroya kommunufelag, IRF og SEV.

# 5. Fíggjarstøðan í kommununum

Tá spurningurin um kommunusamanlegging áður er blivin viðgjørdur, hevur fíggjarstøðan hjá kommununum fingið nógva rúmd í kjakinum. Ofta eru borgarar í móti samanlegging orsakað av, at ein samanlegging hevði ávirkað fíggjarstøðuna í teirra kommunu skeiva vegin.

Í spurnakanning frá 2004 um kommunusamanlegging, sum Granskingardepilin fyri samfelagsmenning stóð fyri, varð eisini spurt, hvørjar orsøkirnar vóru, til at fólk vóru í móti kommunusamanlegging (Holm og Mortensen, 2004). Verri fíggjarstøða var ein av fremstu orsøkunum, sum fólk vístu á. Sostatt er nógv, sum bendir á, at fíggjarstøðan í kommununum kann fáa stóran týdning fyri undirtøkuna fyri eini kommunusamanlegging.

Í hesum kapitli verður hugt nærri at inntøkum, skattaprosentum, útreiðslum og løgum umframt skuld hjá teimum trimum kommununum. Í kap. 13.1 verður fíggjarstøðan hjá eini samanlagdari kommunu lýst.

## 5.1. Inntøkur og skattaprosent

Inntøkurnar hjá kommununum kunnu flokkast í persónsskatt/kommunuskatt, felagsskatt, eftirlønarskatt og afturbering vegna DIS, FAS og frádráttir. Felagsskattur er m.a. partafelagsskattur.

Í mynd 1 síggjast inntøkur frá kommunuskatti umframt skattaprosent fyri Tvøroyrar kommunu, Hvalbiar kommunu og Fámjins kommunu fyri tíðarskeiðið 2016-2022.

Skattaprosentið í Tvøroyrar kommunu er lækkað yvir nøkur ár frá 23,5% í 2015 til 20,9% í 2019, og hevur verið óbroytt síðan. Í Hvalbiar kommunu hevur skattaprosentið verið støðugt seinastu árini á uml. 20%. Í Fámjin lækkaði skattaprosentið í 2020 frá 19% niður í 16%.

**MYND 1: *Kommunuskattainntøkur og skattaprosent, 2016-2022***




*Kelda: Kommunuroknskapir og Taks*

Hóast skattaprosentið í Tvøroyrar kommunu er lækkað í tíðarskeiðinum, eru inntøkurnar frá kommunuskatti hækkaðar við 19% frá 2016 til 2022. Inntøkur frá kommunuskatti í Hvalbiar kommunu eru hækkaðar við 20% í hesum sama tíðarskeiðinum, meðan inntøkurnar í Fámjin hava staðið í stað síðan 2016. Óbroyttar inntøkur í Fámjin stava sjálvsagt eisini frá einum lækkaðum skattaprosenti.

Felagsskatturin er mest sveiggjandi inntøkan hjá nógvum kommunum. Hesin sæst í mynd 2 niðanfyri. Stóru sveiggini í felagsskattinum var ein av orsøkunum til, at skattanevndin í 2016 mælti til at endurskoða, um felagsskatturin eigur at fara inn í kommunukassarnar, og hvussu til ber at tryggja kommunum aðrar meira støðugar inntøkur. (Skattanevndin, 2016)

Tá inntøkur í ymiskum kommunum skulu samanberast, er eisini neyðugt at hyggja eftir tølum fyri hvønn íbúgva. Í talvu 1 síggjast tøl fyri inntøkurnar pr. íbúgva hjá teimum trimum kommununum í 2022, har hesar eru flokkaðar í tey fýra inntøkusløgini.

Inntøkurnar frá kommunuskattinum eru áleið eins stórar í Hvalbiar- og Tvøroyrar kommunu. Eitt lægri skattaprosent hevur sjálvsagt við sær, at inntøkurnar í Fámjin frá kommunuskatti eru lægri enn í hinum báðum kommununum.

Eins og víst varð á í undanfarna broti, sveiggjar felagsskatturin nógv, men kortini kann staðfestast, at felagsskatturin er munandi lægri í Fámjins kommunu enn í hinum báðum kommununum.

Eftirlønarskatturin verður fluttur frá landinum til kommunurnar eftir tali av borgarum í kommununi í aldursbólkinum 67+ ár.

Afturberingin frá serskattaskipanini er sera ymisk millum tær tríggjar kommunurnar. Afturberingin er, at kommunurnar fáa eitt árligt endurgjald frá landinum svarandi til 19,1% av inntøkunum undir serskattaskipanum.

**MYND 2:** ***Felagsskattur, 2016-2022***




*Kelda: Kommunuroknskapir*

**TALVA 1:** ***Inntøka pr. íbúgva, flokkað í inntøkusløgini, 2022***

| | Kommunuskattur | Felagsskattur | Eftirlønarskattur | Afturbering |
|---|---|---|---|---|
| **Tvøroyrar kommuna** | 40.239 | 1.714 | 10.937 | 2.569 |
| **Hvalbiar kommuna** | 40.490 | 2.581 | 11.457 | 2.243 |
| **Fámjins kommuna** | 32.631 | 893 | 19.119 | 833 |

*Kelda: Kommunuroknskapir*

Somuleiðis er áhugavert at samanbera inntøkurnar í teimum trimum kommununum við inntøkur í øðrum kommunum. Á mynd 3 síggjast inntøkur pr. íbúgva fyri allar kommunurnar í landinum, umframt fyri alt landið fyri árið 2022.

Kommunurnar eru raðfestar frá hægst til lægst í mun til samlaðu inntøku pr. íbúgva. Á myndini sæst eisini býtið millum tey ymisku inntøkusløgini. Munurin millum hægstu og lægstu inntøkuna er stórur, oman fyri 20.000 kr. Inntøkan pr. íbúgva fyri alt landið lá á 54.208,80 kr. í 2022. Tær tríggjar kommunurnar, Hvalbiar- Fámjins- og Tvøroyrar kommunur liggja tætt við miðal fyri alt landið.

**MYND 3:** ***Inntøkur samanlagt í kr. pr. íbúgva í 2022 fyri allar kommunurnar, flokkað eftir inntøkuslagi.***




*Kelda: Kommunufelagið*

## 5.2. Útreiðslur og løgur

Í lýsingunum av kommununum vóru útvaldar útreiðslur og løgur í 2022 eisini lýstar. Í talvu 2 síggjast tøl fyri útreiðslur og løgur hjá øllum trimum kommununum.

Kommunurnar eru ymiskar bæði í stødd og tá hugt verður eftir aldursbýtinum á íbúgvunum.[1] Hetta sæst eisini aftur í útreiðslunum og løgunum hjá kommunum. Fámjins kommuna hevur lutfalsliga fleiri eldri íbúgvar enn hinar báðar kommunurnar, og tí hevur Fámjins kommuna eisini hægri eldraútreiðslur pr. íbúgva. Eldraútreiðslurnar pr. íbúgva í Fámjins kommunu vóru næstan 24.000 kr. Í hinum kommununum vóru útreiðslurnar til eldraøkið umleið 13.300 kr. pr. íbúgva. Hinvegin eru útreiðslurnar til barnaansing og fólkaskúla munandi hægri í Tvøroyrar- og í Hvalbiar kommunu.

Støddin á kommununi hevur sjálvsagt eisini týdning. Teknisk mál kostaðu meiri enn 30.000 kr. pr. íbúgva í Fámjin, meðan Tvøroyrar kommuna brúkti 9.500 kr. pr. íbúgva og Hvalbiar kommuna 4.200 kr. pr. íbúgva. Útreiðslur til teknisk mál kunnu sjálvsagt sveiggja nógv, og hetta merkist væl í smáum kommunum.

Harumframt sæst, at Tvøroyrar kommuna brúkti munandi meira pengar til mentan í 2022 enn hinar kommunurnar. Tvøroyrar kommuna brúkti umleið 5.800 kr. til mentan pr. íbúgva.

**TALVA 2:** ***Útvaldar útreiðslur og løgur í 2022, í 1.000 kr.***

| | Tvøroyri | Hvalba | Fámjin |
|---|---|---|---|
| Útreiðslur og løgur samanlagt | 99.157 | 31.091 | 5.579 |
| Fyrisiting | 10.266 | 2.225 | 450 |
| Fyrisiting pr. íbúgva | 5,9 | 3,3 | 5,7 |
| Samsýningar o.a. til býráðslimir | 1.576 | 800 | 41 |
| Mentan og frítíð | 10.229 | 1.550 | 87 |
| Mentan og frítíð pr. íbúgva | 5,8 | 2,3 | 1,1 |
| Barnaansing | 13.412 | 6.339 | - |
| Barnaansing pr. íbúgva | 7,7 | 9,5 | - |
| Fólkaskúlin | 10.387 | 2.383 | 206 |
| Fólkaskúlin pr. íbúgva | 5,9 | 3,6 | 2,6 |
| Teknisk mál | 16.701 | 2.817 | 2.375 |
| Teknisk mál pr. íbúgva | 9,5 | 4,2 | 30,1 |
| Eldraøkið | 23.306 | 8.889 | 1.891 |
| Eldraøkið pr. íbúgva | 13,3 | 13,3 | 23,9 |

*Kelda: Kommunuroknskapir*

1 Aldursbýtini á íbúgvunum verða nærri lýst í kap. 6.

## 5.3. Skuld

Nettoskuldin pr. íbúgva í 2022 var lægst í Tvøroyrar kommunu og hægst í Fámjins kommunu. Hetta sæst í talvu 3. Langfreistaða skuldin í 2022 hjá ávikavist Fámjins-, Hvalbiar-, og Tvøroyrar kommunum var 2,2 mió.kr., 27,2 mió.kr. og 45,9 mió.kr. Samanlagt var langfreistaða skuldin sostatt 75,4 mió.kr.

**TALVA 3:** ***Skuld í einstøku kommununum og samanlagt í 2022, í 1.000 kr.***

| | Fámjin | Hvalba | Tvøroyri | Samanlagt |
|---|---|---|---|---|
| **Nettoskuld** | 2.234 | 15.381 | 38.154 | 55.769 |
| **Langfreistað skuld** | 2.249 | 27.237 | 45.922 | 75.408 |
| **Fólkatal 31/12-22** | 79 | 666 | 1.774 | 2.519 |
| **Nettoskuld pr. íbúgva** | 28,3 | 23,1 | 21,5 | 22,1 |
| **Langfreistað skuld pr. íbúgva** | 28,5 | 40,9 | 25,9 | 29,9 |

*Kelda: Hagstovan*

Nettoskuldin hjá Tvøroyrar kommunu er broytt munandi seinastu 20-25 árini. Hetta sæst greitt í mynd 4. Nettoskuldin var tann hægsta í landinum um ár 2000, men er lækkað nógv síðan og liggur nú á sama støði, sum í Hvalbiar kommunu. Bæði Hvalbiar kommuna og Fámjins kommuna hava havt lága skuld (ella nettoogn) ein stóran part av tíðarskeiðinum síðan 1993. Í dag er støðan tó øðrvísi, og nettoskuldin í Fámjin liggur nakað oman fyri nettoskuldina í hinum báðum kommununum.

**MYND 4:** ***Nettoskuld pr. íbúgva, 1993-2022***




*Kelda: Hagstovan*

Kommunala skuldarmarkið er definerað sum tann upphædd, ið kommunan hevði fingið inn í kommunuskatti, um skattaprosentið var 23%, umframt inntøkur frá eftirlønarskatti og afturberingini. Skuldarmarkið hækkaði 1. januar, tá inntøkurnar frá eftirlønarskatti og afturberingini eisini vórðu roknaðar við.

Í talvu 4 niðanfyri sæst ein uppgerð av nettoskuldini fyri 2022 og skuldarmarkinum fyri tær tríggjar kommunurnar. Allar kommunurnar liggja rættiliga javnar í mun til skuldarmarkið. Nettoskuldin í mun til roknaðu inntøkuna er 35,2% fyri Fámjins kommunu, 37,8% fyri Hvalbiar kommunu og 36,4% fyri Tvøroyrar kommunu.

**TALVA 4:** ***Uppgerð av nettoskuld í 2022, í 1.000 kr.***

| | Fámjin | Hvalba | Tvøroyri |
|---|---|---|---|
| **Skattaprosent** | 16,00 | 20,75 | 20,90 |
| **Skattainntøka** | 4.417 | 36.741 | 95.129 |
| **Umroknað til 23% (skuldarmark)** | 6.349 | 40.725 | 104.687 |
| **Gjaldføri** | 260 | 6.786 | 4.859 |
| **Langfreistað skuld** | -2.249 | -27.237 | -45.922 |
| **Debitorar** | -15 | 5.982 | 12.233 |
| **Stuttfreistað skuld** | -230 | -912 | -9.324 |
| **Nettoskuld** | -2.234 | -15.381 | -38.154 |
| **Nettoskuld í prosentum av umrokn. inntøku** | 35,2 | 37,8 | 36,4 |
| **Munur á álíkning og skuld** | 4.115 | 25.344 | 66.533 |

*Kelda: Kommunuroknskapir*

Í frágreiðingini frá 2004 frá granskingardeplinum fyri samfelagsmenning varð víst á, at fíggjarstøðan hjá kommunum í Suðuroynni var sera ymisk. Nakrar av kommununum høvdu sera stóra skuld, meðan aðrar høvdu eina nettoogn, og mett varð, at hetta gjørdi tað meiri trupult at finna eina semju millum kommunurnar um kommunusamanlegging. (Holm og Mortensen, 2004)

Tølini, ið vórðu greinað í tí frágreiðingini, vóru frá 2002, og fíggjarstøðan hjá hesum trimum kommunum í norðaru helvt er broytt munandi síðan 2002.

Samanumtikið vísa tølini, sum eru løgd fram í hesum kapitlinum, at í dag eru hesar tríggjar kommunurnar ikki ymiskar, hvat viðvíkur skuld. Sostatt er skuldin ikki longur ein forðing fyri samanlegging.

# 6. Fólkatalið í kommununum

Tá mett verður um avbjóðingar hjá kommununum í Suðuroy, er neyðugt at greina gongdina í fólkatalinum og aldursbýtinum á íbúgvunum komandi árini.

Fólkatalið í Hvalbiar kommunu, Tvøroyrar kommunu og Fámjins kommunu var í november 2023 samanlagt 2465 fólk. Helmingurin av suðuroyingum búgva í einum av hesum trimum kommununum.

Myndir 5-7 lýsa gongdina í fólkatalinum í hesum kommununum í tíðarskeiðinum 1985-2022, og á øllum trimum myndunum eru hægsta og lægsta fólkatalið merkt.

Við ársbyrjan 2023 var fólkatalið í Hvalbiar kommunu 666 fólk, sum eisini er lægsta fólkatalið, sum er skrásett í tíðarskeiðinum. Hægsta fólkatalið í Hvalbiar kommunu í tíðarskeiðinum var 850 fólk, sum varð skrásett fyrst í nítiárunum.

**MYND 5:** ***Fólkatalið í Hvalbiar kommunu, 1985-2023***




***Viðmerking:*** *Talan er um fólkatalið 1. januar í árunum.*

*Kelda: Hagstovan*

Fólkatalið í Tvøroyrar kommunu var 1767 við ársbyrjan í 2023, sum er nakað hægri enn lægsta fólkatalið, ið er skrásett síðan 1985, og er Tvøroyrar kommuna sostatt eisini tann einasta av hesum trimum kommunum, sum hevur havt ein fólkavøkstur seinastu árini.

**MYND 6:** ***Fólkatalið í Tvøroyrar kommunu, 1985-2023***




***Viðmerking:*** *Talan er um fólkatalið 1. januar í árunum.*

*Kelda: Hagstovan*

Fólkatalið í Fámjins kommunu var 79 fólk við ársbyrjan í 2023, og hetta er eisini lægsta fólkatalið, sum er skrásett í Fámjin. Í fyrru helvt av nítiárunum vóru 135 fólk búsitandi í Fámjin, sum er hægsta fólkatalið í kommununi síðan 1985.

**MYND 7:** ***Fólkatalið í Fámjins kommunu, 1985-2023***




***Viðmerking:*** *Talan er um fólkatalið 1. januar í árunum.*

*Kelda: Hagstovan*

Mynd 8 niðanfyri lýsir nærri gongdina í fólkatalinum í hesum trimum kommununum, og samanborið verður við gongdina í øllum landinum.

Í tíðarskeiðinum 1985-2022 er fólkatalið í øllum landinum vaksið við 18 prosentum, meðan samantalda fólkatalið í Suðuroynni er minkað við 21 prosentum.

Lutfalsliga minkingin er størst í Fámjins kommunu, har fólkatalið er minkað við 36 prosentum í hesum tíðarskeiðinum. Í Hvalbiar kommunu og Tvøroyrar kommunu er fólkatalið minkað við ávikavist 19 prosentum og 17 prosentum.

**MYND 8:** ***Gongdin í fólkatalinum í Hvalbiar kommunu, Tvøroyrar kommunu, Fámjins kommunu og í øllum landinum, 1985-2022***




***Viðmerking:*** *Fólkatalið 1. juli í árinum. Vísitøl, har 1985 er støðisár.*

Broytingar í fólkatalinum stava annaðhvørt frá burðaravlopinum, t.e. muninum millum tal av føddum og tal av deyðum ella frá nettotilflyting. Sjálvsagt hanga hesi bæði eisini saman, tí í einum øki, har ung fólk ikki flyta aftur eftir loknan lestur, verður, sum frálíður, eitt lágt burðaravlop.

Myndir 9-11 vísa broytingarnar í fólkatalinum fyri hesar tríggjar kommunurnar, har broytingarnar verða flokkaðar í burðaravlop og nettotilflyting.

Á øllum trimum myndunum sæst, at burðaravlopið er negativt í fleiri av árunum síðan 1985, eisini fyri størstu kommununa Tvøroyrar kommunu. Til samanberingar skal nevnast, at burðaravlopið fyri alt landið hevur verið positivt øll árini síðan 1985.

Samanløgdu burðaravlopini seinastu 10 árini hava verið -3 í Hvalbiar kommunu, 12 í Tvøroyrar kommunu og -12 í Fámjins kommunu.

Eitt negativt ella lágt burðaravlop eyðkennir kommunur í útjaðaranum og er fyrst og fremst eitt tekin um, at íbúgvararnir í útjaðaranum eru eldri enn íbúgvar aðrastaðni í landinum.

Negativa ella lága burðaravlopið hjá hesum trimum kommunum í Suðuroynni stavar tó ikki einans frá aldursbýtinum í hesum kommununum. Kvinnurnar í hesum kommunum, sum eru í burðarførum aldri[2], fáa eisini færri børn enn kvinnur í burðarførum aldri í restini av landinum.

2 Her er aldursbólkurin 15-49 ár nýttur, sum svarar til allýsingina hjá donsku hagstovuni.

**MYND 9:** ***Fólkatalsbroyting í Hvalbiar kommunu býtt á burðaravlop og nettotilflyting, 1985-2022***




*Kelda: Hagstovan*

Á mynd 9 omanfyri sæst, at Hvalbiar kommuna hevur havt eina lutfalsliga høga fráflyting. Seinastu 10 árini hevur kommunan havt eina nettofráflyting upp á 40 fólk.

**MYND 10:** ***Fólkatalsbroyting í Tvøroyrar kommunu býtt á burðaravlop og nettotilflyting, 1985-2022***




*Kelda: Hagstovan*

Mynd 10 omanfyri vísir, at Tvøroyrar kommuna var sera meint rakt av kreppuni í nítiárunum. Nøkur ár hevur nettotilflytingin verið positiv, men nógv tey flestu árini hevur fráflytingin verið størri enn tilflytingin.

**MYND 11:** ***Fólkatalsbroyting í Fámjins kommunu býtt á burðaravlop og nettotilflyting, 1985-2022***




*Kelda: Hagstovan*

Fámjins kommuna er minsta kommunan í Suðuroynni, og búfjøldin er eldri, enn í hinum báðum kommununum. Hetta sæst aftur á burðaravlopinum, sum hevur verið negativt flestu árini síðan 1985.

Samstundis sum samlaða fólkatalið í Suðuroynni er minkað við umleið 20 prosentum síðan 1985, er fólkatalið í aldursbólkinum 67+ ár vaksið við meiri enn 30 prosentum.

Í talvu 5 framgongur, at aldursbýtið í Suðuroynni víkir frá aldursbýtinum í restini av landinum.

Í februar 2023 vóru umleið 20 prosent av íbúgvunum í Hvalbiar- og Tvøroyrar kommunum 67 ár ella eldri, meðan í Fámjin var hetta talið 30 prosent. Til samanberingar vóru einans góð 14 prosent av íbúgvunum í Tórshavnar kommunu 67 ár ella eldri.

**TALVA 5:** ***Eldri aldursbólkarnir, sum % av fólkatalinum, februar 2023***

| | Hvalba | Tvøroyri | Fámjin | Samanløgd kommuna | Alt landið | Tórshavn | Alt landið *uttan Tórshavn* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 67+ ár, % av fólkatalinum | 20,7% | 20,4% | 29,5% | 20,8% | 15,7% | 14,4% | 16,6% |
| 80+ ár, % av fólkatalinum | 6,7% | 5,1% | 9,0% | 5,6% | 4,6% | 4,2% | 5,0% |

*Kelda: Hagstovan*

Búfjøldin í Suðuroynni hevur alt tíðarskeiðið frá 1985 og fram til dag verið eldri enn búfjøldin í restini av landinum.

Í 1985 vóru 12,5 prosent av íbúgvunum í Suðuroynni 67 ár ella eldri, meðan talið fyri alt landið var 9,5 prosent. Munurin hevur tó verið vaksandi hetta tíðarskeiðið.

Hetta sæst eisini á mynd 12 niðanfyri.

**MYND 12:** ***67+ ár, sum prosent av fólkatalinum í kommununi, 1985-2023***




*Kelda: Hagstovan*

Eisini í aldursbólkinum 80+ ár eru lutfalsliga fleiri fólk í kommununum í Suðuroynni (sí talvu 5).

Um hugt verður eftir øllum landinum, eru 4,6 prosent av íbúgvunum í aldursbólkinum 80+ ár. Verða tær tríggjar kommunurnar lagdar saman eru 5,6 prosent í hesum aldursbólkinum.

Orsøkin til, at hesin aldursbólkurin eisini verður tikin fram, er at tað er um henda aldurin, at miðalútreiðslurnar fyri hvønn persón byrja at vaksa, tí fleiri hava tørv á røkt. Sum framrokningin í komandi broti vísir, kunnu væntast stórar broytingar í hesum lutføllum komandi árini.

## 6.1. Framrokning av fólkatalinum

Í hesum partinum verður hugt at framtíðarútlitunum fyri fólkatalinum, og hvussu aldursbýtið á búfjøldini væntandi fer at broytast komandi árini.

**TALVA 6:** ***Fólkatalið í 2023 og framrokning fyri 2050***

| Aldursbólkar | 2023 – Tal av fólki | 2023 – Býtið | 2050 – Tal av fólki | 2050 – Býtið |
|---|---|---|---|---|
| 0-6 ár | 192 | 8% | 147 | 7% |
| 7-16 ár | 305 | 12% | 243 | 12% |
| 17-66 ár | 1492 | 59% | 1069 | 52% |
| 67-79 ár | 381 | 15% | 328 | 16% |
| 80+ ár | 141 | 6% | 264 | 13% |
| Samanlagt | 2511 | 100% | 2051 | 100% |

Í talvu 6 síggjast framrokningar av fólkatalinum fram til ár 2050, umframt samanberandi tøl fyri 2023.

Framrokningarnar eru gjørdar fyri allar tríggjar kommunurnar samanlagt og ikki fyri hvørja einstøku av teimum trimum kommununum.

Sambært framrokningini minkar fólkatalið í hesum trimum kommununum við 460 fólkum fram til 2050, sum svarar til eina minking á umleið 18 prosent.

Framrokningin vísir eitt stórt fall í aldursbólkinum 17-66 ár, sum undir óbroyttum umstøðum annars hevur við sær lægri almennar inntøkur.

Aldursbólkurin 67-79 ár er nærum óbroyttur í prosentum, men aldursbólkurin 80+ ár veksur stórliga.

Eins og víst varð á í undanfarna broti, er júst hesin aldursbólkurin vaksin nógv seinastu árini.

Samanumtikið eru útlit fyri, at skattainntøkurnar hjá kommununum verða lægri, samstundis sum talið av borgarum, sum eru 80 ár og eldri og hava tørv á røkt, verður størri.

Fólkatalsframrokningin er gjørd við støði í tølum frá tíðarskeiðinum eftir kreppuna í 1990-árunum og fram til í dag.

Í høvuðsheitum eru trý viðurskifti, sum ávirka gongdina í fólkatalinum. Hesi eru (i) livialdur, (ii) barnatal og (iii) til- og fráflyting.

Livialdurin er hækkaður við umleið 5 árum síðan 1995, og í framskrivingini fram til 2050, verður sett sum fortreyt, at hesin vøkstur heldur fram.

Her skal leggjast afturat, at í tí førinum, at livialdurin ikki økist, er kortini stórur vøkstur í 80+ aldursbólkinum.

Fødd børn árliga fyri hvørja kvinnu í burðarførum aldri er sett at vera 0,06 í øllum framrokningartíðarskeiðinum. Hetta er nakað lægri enn talið fyri alt landið, men er møguliga nakað høgt, um lágu barnatølini í 2022 og 2023 boða frá eini broyttari gongd í barnatalinum framyvir.

Framrokningin tekur støði í einum fráflytingarmynstri, sum hevur verið galdandi fyri alla Suðuroynna seinastu umleið 20-25 árini. Talan er um stóra nettofráflyting í aldursbólkinum 20-29 ár. Nettotilflyting er til økið í eldru aldursbólkunum, men sum heild er fráflytingin bæði munandi størri og meiri støðug enn tilflytingin.

## 6.2. Arbeiðsmarknaðurin í Suðuroynni

Omanfyri greining av fólkatali og aldursbýti bendir greitt á, at arbeiðsfjøldin fer at minka í framtíðini.

Arbeiðsmarknaðurin í Suðuroynni er serstakur á tann hátt, at hesin er sundurskildur frá føroyska arbeiðsmarknaðinum annars. Frástøðan hevur við sær hægri arbeiðsloysi og eina minni arbeiðsfjøld enn í restini av landinum.

Niðanfyri síggjast hagtøl fyri arbeiðsfjøldina og arbeiðsloysið í Suðuroynni og í øllum landinum. Mynd 13 niðanfyri vísir arbeiðsfjøldina sum prosent av fólkatalinum. Hesi eru tey, sum annaðhvørt eru í starvi ella arbeiðssøkjandi, t.e. fáa stuðul úr arbeiðsloysisskipanini, og sostatt eru hesi tøk arbeiðsmegi í økinum.

Á myndini niðanfyri sæst, at lutfalsliga færri íbúgvar eru partur av arbeiðsfjøldini í Suðuroynni enn í Føroyum um heild. Í Suðuroynni vóru 84,8 prosent av íbúgvunum í arbeiðsfjøldini í 2023, meðan talið var 89,5 prosent fyri alt landið. Ein orsøk til hetta er sjálvsagt aldursbýtið í Suðuroynni, har størri partur av íbúgvunum eru í aldursbólkinum 67+ ár.

**MYND 13:** ***Arbeiðsfjøldin sum prosent av fólkatalinum, 2005-2023***




*Kelda: Hagstovan*

Arbeiðsloysið í prosentum er víst í mynd 14 niðanfyri. Her er talan um partin av arbeiðsfjøldini, sum er arbeiðssøkjandi. Arbeiðsloysið er hægri í Suðuroynni enn í restini av landinum, tó at arbeiðsloysið í dag er sera lágt, bæði í Føroyum sum heild og eisini í Suðuroynni.

**MYND 14:** ***Arbeiðsloysið í prosentum fyri alt landið og Suðuroynna, januar 2006 – januar 2024***




*Kelda: Hagstovan*

Tá arbeiðsmarknaðurin og arbeiðsloysistøl verða greinað, hevur langtíðararbeiðsloysið serligan áhuga. Hesi eru tey, sum hava verið arbeiðsleys í longri enn 1 ár. Á mynd 15 niðanfyri sæst, at langtíðararbeiðsloysið er munandi hægri í Suðuroynni enn í Føroyum sum heild.

Arbeiðsloysi í longri tíð kann hava stórar avleiðingar fyri tann einstaka arbeiðsleysa, bæði hvat viðvíkur heilsuna og fíggjarligu støðuna hjá viðkomandi, og harumframt er langtíðararbeiðsloysi eitt tekin um ein stirvnan arbeiðsmarknað, har førleikar og størv ikki samsvara.

**MYND 15:** ***Langtíðararbeiðsleys (365+ dagar), november 2016-januar 2024***




*Kelda: Hagstovan*

Fyri alt landið eru 37% av løntakarunum settir í almenna geiran. Í Suðuroynni eru 39% í almenna geiranum. Í talvu 7 niðanfyri sæst, hvussu stórur partur av løntakarunum í ymisku økjunum eru settir í almenna geiran.

**TALVA 7:** ***Løntakarar tilsamans og í almenna geiranum, nov. 2023***

| | Løntakarar tilsamans | Løntakarar í almenna geiranum | Prosentpartur í almenna geiranum |
|---|---|---|---|
| Alt landið | 28.231 | 10.535 | 37% |
| Norðoya øki | 3.437 | 1.166 | 34% |
| Eysturoyar øki | 6.651 | 2.232 | 34% |
| Norðstreymoyar øki | 2.037 | 731 | 36% |
| Suðurstreymoyar øki | 11.684 | 4.735 | 41% |
| Vága øki | 1.696 | 590 | 35% |
| Sandoyar øki | 581 | 240 | 41% |
| Suðuroyar øki | 2.145 | 841 | 39% |

*Kelda: Hagstovan*

Øll tøl vísa, at Suðuroyggin er í eini truplari støðu, sum bara verður verri, um einki verður gjørt.

Haldføristrupulleikin er størri í Suðuroynni enn í restini av landinum. Meðan Føroyar hava havt stóran fólkavøkstur seinastu 10 árini, er fólkatalið minkað í Suðuroynni. Minkingin er grundað á fólkafráflyting og lægri burðartal. Um samanborið verður við restina av landinum, eru tey eldri ein lutfalsliga størri partur av fólkinum í Suðuroynni, meðan tey í arbeiðsførum aldri og børnini eru lutfalsliga færri í tali.

Samanumtikið er eingin ivi um, at neiliga gongdin í fólkatalinum og aldurssamansetingini er partur av stóru avbjóðingini í Suðuroynni. Fámjins-, Hvalbiar- og Tvøroyrar kommunur hava somu avbjóðingar í framtíðar fólkatali og aldurssamanseting. Verða kommunurnar lagdar saman, verða framhaldandi somu stóru avbjóðingar í fólkatalinum og aldursbýtinum, har trupulleikin verður, at færri verða at rinda fyri fleiri.

Samstundis eru fleiri avbjóðingar viðvíkjandi arbeiðsmarknaðinum í Suðuroynni samanborið við restina av landinum. Ein minni partur av íbúgvunum eru í starvi ella starvsøkjandi. Harumframt er arbeiðsloysið hægri enn í restini av landinum, og serliga er talið av langtíðararbeiðsleysum høgt í Suðuroynni.



# 7. Barnaansing í kommununum

Barnaansing er næststørsta virkisøki hjá flestu kommununum. Í 2022 vóru útreiðslur og løgur innan barnaansing á Tvøroyrar kommunu 13,4 mió. kr. og 6,3 mió. kr. í Hvalbiar kommunu.

Barnaansingin er fíggjað við brúkaragjaldi og gjøgnum kommunuskattin. Sambært løgtingslógini um dagstovnar og dagrøkt, kann foreldragjaldið tó í mesta lagi vera 30 prosent av rakstrarútreiðslunum.

Bæði í Hvalbiar- og í Tvøroyrar kommunum eru stórar íløgur gjørdar í dagstovnar seinastu árini, og báðar kommunur hava í dag nútímans dagstovnar. Dagstovnurin í Hvalba lat upp í 2017, og dagstovnurin á Tvøroyri varð liðugt útbygdur í 2020.

1. februar 2024 vóru 97 børn í barnagarðinum á Tvøroyri, harav 6 úr Hovi og 1 úr Fámjin. Í frítíðarskúlanum ganga 23 børn, harav 1 er úr Hovi.

Barnagarðurin á Tvøroyri umfatar vøggustovu, barnagarð og frítíðarskúla. Har arbeiða 11 námsfrøðingar og 42 hjálparfólk. Tað eru 34,15 ársverk knýtt at barnagarðinum á Tvøroyri, íroknað vaskifólk, húsavørð og køkshjálp.

Barnagarðurin í Hvalba umfatar vøggustovu, barnagarð og frítíðarskúla, og nøktar hetta tørvin fyri Hvalba. Har arbeiða 5 námsfrøðingar og 12 hjálparfólk. Tað eru 14,15 ársverk knýtt at barnagarðinum í Hvalba, íroknað húsavørð og vaskifólk.

Talið av børnum í ansingaraldri hevur verið fallandi seinastu nógvu árini. Orsøkirnar til hetta eru bæði eitt fallandi fólkatal og eitt lægri burðartal. Framrokningin av fólkatalinum bendir eisini á, at talið av børnum í ansingaraldri fer at minka komandi árini, og sostatt verður eisini minni tørvur á ansingarplássum og íløgum í tílík framyvir.



# 8. Skúlarnir í kommununum

Í Føroyum hava ymisk álit og tilmæli um kommunala bygnaðin víst á, at ein orsøk til, at kommunurnar skulu skipast í størri eindir, er at tær skulu verða førar fyri at umsita fólkaskúlaøkið.

Enn er fólkaskúlaøkið ein landsuppgáva, og síðan eldraøkið varð lagt út til kommunurnar, hevur millum lítið og onki kjak verið um at flyta fólkaskúlaøkið til kommunurnar at umsita.

Fólkaskúlin er skipaður eftir løgtingslóg nr. 125, 20. juni 1997. Landið hevur ábyrgdina av lærarum og innihaldi, meðan kommunurnar hava ábyrgdina av bygningum, húsavørðum, viðlíkahaldi, bókasavni og so framvegis.

Í sambandi við viðgerð av eini møguligari samanlegging av kommununum í norðaru helvt av Suðuroynni, er spurningurin um skúlaviðurskiftini sera viðkomandi, tá avgerð skal takast.

Bygdaskúlin ella fólkaskúlin hevur í mansaldrar verið ímyndin av einum mentanarmiðdepli, hvørs endamál er at kjølfesta børnini í upplæring, vitan og mennandi samveru. Tí er tað ofta ein sera viðkvæmur spurningur at viðgera møguligar broytingar viðvíkjandi skúlanum, og tað vilja altíð vera ymiskar meiningar millum fólk, hvat er skilabest at gera.

Niðanfyri verða verandi skúlar í teimum trimum kommununum lýstir, umframt tey samstørv, sum í dag eru millum kommunurnar um skúlan.

## 8.1. Skúlin í Tvøroyrar kommuni

Tvøroyrar skúli er skipaður í eina deild í Trongisvági, eina deild á Tvøroyri og eitt sertilboð, sum er staðsett í gamla skúlahúsinum á Tvøroyri.

Deildin í Trongisvági hevur 5 flokkar, frá forskúla til og við 3. flokk. Deildin í Trongisvági hevur tveir fyrsta flokkar, ein 2. flokk og ein 3. flokk.

Samanlagt eru 84 næmingar á deildini í Trongisvági íroknað forskúlan, har 22 næmingar ganga.

Í talvuni niðanfyri sæst næmingatalið í flokkunum fyri skúlaárið 23/24

**TALVA 8:** ***Næmingatal í deildini í Trongisvági skúlaárið 23/24***

| Árgangur | Næmingatal |
|---|---|
| **Forskúli** | **22** |
| **1.** | **25** |
| **2.** | **15** |
| **3.** | **22** |

Deildin á Tvøroyri hevur undirvísing frá 4. flokki til 10. flokk. Samanlagt eru 131 næmingar. Næmingarnir eru soleiðis býttir upp millum flokkarnar:

**TALVA 9:** ***Næmingatal í deildini á Tvøroyri skúlaárið 23/24***

| Árgangur | Næmingatal |
|---|---|
| 4. | 22 |
| 5. | 18 |
| 6. | 22 |
| 7. | 25 |
| 8. | 22 |
| 9. | 18 |
| 10. | 4 |

Fríggjadagar er breytaundirvísing í 8. og 9. flokki í Tvøroyrar skúla. Hesar breytir umfata t.d. smíð, hondarbeiði, kost & rørslu, osfr. Fleiri næmingar úr Hvalbiar skúla møta fríggjadagar til hesar breytir.

Til breytir í 10. flokki er samstarv millum Tvøroyrar skúla og Vágs skúla. Ónsdagar og fríggjadagar eru hesir næmingar í Vági, hinar dagarnar á Tvøroyri.

Næmingarnir á Føroya eftirskúla fylgja breytunum í 10. flokki í Tvøroyrar skúla, eins og eftirskúlanæmingar fylgja bókligu lærugreinunum í Tvøroyrar skúla.

Leiðslan í Tvøroyrar skúla er stjóri, varastjóri og ein deildarleiðari. Skúlin hevur 21 lærarar og 5 tímalærarar, sum eru sergreinalærarar, og skúlin hevur tríggjar námsfrøðingar og tríggjar stuðlar. Skúlin hevur eitt skúlastýri við 6 limum: foreldrini velja tríggjar, kommunan tveir og skúlin ein. Stjórin er skrivari.

Deildin í Trongisvági, 1. og 2. flokkur, brúkar tvílæraraskipan við einum lærara og einum námsfrøðingi. Sambært skúlaleiðsluni á Tvøroyri er tvílæraraskipanin við lærara og námsfrøðingi í 1. og 2. flokki góð fyri børnini sum fyrireiking til víðari skúlaskap.

Útreiðslur og løgur hjá Tvøroyrar kommunu til fólkaskúlan vóru í 2022 samanlagt 10,4 mió.kr.

## 8.2. Fámjins skúli

Fámjins skúli er í dag í teirri støðu, at har er eingin næmingur og eingin lærari. Tvey børn eru í verandi løtu undir skúlaaldri. Tá flest børn gingu í Fámjins skúla, var næmingatalið 24 í 1985. Fámjins skúli er ikki niðurlagdur, men óvirkin, tí eingir næmingar eru. Børnini í Fámjin gingu í Fámjins skúla til og við 6. flokk, tá tey fóru á Tvøroyri at ganga í skúla.

Útreiðslur og løgur hjá Fámjins kommunu til fólkaskúlaøkið vóru í 2022 samanlagt 206.000 kr.

## 8.3. Hvalbiar skúli

Hvalbiar skúli er bygdur í 1973. Neyðugt var at byggja nýggjan skúla fyri at nøkta tørvin, sum tá var.

Áðrenn nýggi skúlin varð tikin í nýtslu, var skúli í Nesi, í Garðsini mitt í bygdini og í Sandvík.

Við nýggja skúlanum vórðu skúlin í Nesi og í Garðsini niðurlagdir, meðan skúlin í Sandvík varð lagdur saman við Hvalbiar skúla seinni vegna lága barnatalið í Sandvík. Hvalbiar skúli er í dag sostatt einasti skúlin í sóknini.

Hvalbiar skúli hevur 10 lærarar, ein stjóra og ein varastjóra. Í dag ganga 79 næmingar í skúlanum.

Hvalbiar skúli hevur 9 flokkar, frá fyrsta flokki til og við 9. flokk. Teir næmingar, sum velja at fara víðari í 10. flokk, ganga í 10. flokki á Tvøroyri.

Nakrir flokkar hava í nøkrum lærugreinum felags undirvísing í Hvalbiar skúla, grundað á lágt næmingatal.

Útreiðslur og løgur til fólkaskúlan í Hvalbiar kommunu vóru í 2022 samanlagt 2,4 mió. kr.

**TALVA 10:** ***Næmingatal í Hvalbiar skúla skúlaárið 23/24***

| Árgangur | Næmingatal |
|---|---|
| 1. | 11 |
| 2. | 8 |
| 3. | 7 |
| 4. | 11 |
| 5. | 10 |
| 6. | 7 |
| 7. | 8 |
| 8. | 10 |
| 9. | 7 |

# 9. Bú- og heimatænastan í Suðuroynni

Sum áður lýst, eru allar tær 7 kommunurnar í Suðuroynni sambært lóg skipaðar í eitt kommunalt samstarvsøki um eldraøkið, sum verður kallað Bú- og heimatænastan í Suðuroy (BHS).

Stýrið fyri kommunala samstarvið í Suðuroynni er sett saman við 9 limum. Sum er, hava Hvalbiar-, og Fámjins kommuna hvør sítt umboð í stýrinum, meðan Tvøroyrar kommuna hevur tvey umboð, tí fólkatalið er omanfyri 1000 fólk.

Kommunurnar í norðaru helvt hava 4 stýrislimir, og kommunurnar í sunnaru helvt hava 5 limir, tí tað eru fleiri kommunur.

Bú- og heimatænastan í Suðuroynni veitir eina røð av fjøltáttaðum tænastum, tilboðum og bútilboðum til borgarar.

Kommunurnar hava ábyrgd av at veita tilboðini, sum eru skipaði sambært løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Løgtingslógin um heimatænastu, eldrarøkt v.m. er ein rammulóg, ið gevur kommunum heimild til sjálvar at gera av, hvørjar tænastur og bútilboð borgarar í kommununi fáa bjóðað.

### *Bú- og heimatænastan veitir fylgjandi búpláss og tænastur:*

- **Eldrabústaðir**
- **Heimahjálp**
- **Heimasjúkrarøkt**
- **Umlætting**
- **Venjing/rehabilitering**
- **Matútbering**
- **Dagtilhald**
- **Heimavitjan til 75+**

## 9.1. Eldrabústaðir

Tað eru 2 ellis- og røktarheim og 2 eldrasambýli í Suðuroynni, ið veita búpláss og umlætting. Samanlagt eru 67 búpláss og 3 umlættingarpláss. Eldrasambýlið í Vági og ellisheimið í Vági eru bygd til endamálið. Eldrasambýlið í Hvalba er eini sethús, og ellis- og røktarheimið á Tvøroyri hevur nógv ár á baki og er sambært fyrrverandi stjóranum í Bú- og heimatænastuni ótíðarhóskandi.

Í talvuni niðanfyri síggjast bú- og umlættingarpláss á ymisku heimunum.

**TALVA 11:** ***Bú- og umlættingarpláss hjá BHS, apríl 2023***

| Stað | Fast pláss | Umlætting | Í alt |
|---|---|---|---|
| Hamragarður | 23 | 2 | 25 |
| Suðuroyar ellis- og røktarh. | 23 | 1 | 24 |
| Heimið í Hvalba | 9 | | 9 |
| Heimið í Vági | 12 | | 12 |
| Í alt | 67 | 3 | 70 |

*Kelda: BHS*

Tað eru eitt ellis- og røktarheim og eitt eldrasambýli í norðaru helvt.

Bú- og heimatænastan ger tó ikki mun á, hvar í oynni borgarin býr, tá pláss verða tillutað.

Tað er tískil ikki nøkur kommuna ella øki, sum eiga nakað fast pláss á nøkrum heimi. Tá eitt pláss er tøkt, er tað tann við størsta tørvi, sum fær plássið bjóðað, og ynskini hjá borgara verða tikin við í tann mun, tað er møguligt.

Talvan niðanfyri vísir, í hvørjum kommunum borgarar í eldrabústøðunum búgva.

**TALVA 12:** ***Bústaður hjá borgarum í eldrabústøðum í Suðuroynni, apríl 2023***

| Stað | Borgarar |
|---|---|
| Hvalba | 14 |
| Tvøroyri | 22 |
| Fámjin | 2 |
| Hov | 0 |
| Porkeri | 3 |
| Vágur | 23 |
| Sumba | 3 |
| Umlætting | 3 |
| Í alt | 70 |

*Kelda: BHS*

Umlættingarplássini verða veitt eftir tørvi. Sambært Bú- og heimatænastuni kann tað verða stórt trýst á umlættingarplássini, og harumframt vóru tað í januar 2024 11 borgarar á bráðfeingisbíðilista til búpláss.

## 9.2. Tænastur

### *Sambært uppgerð frá Bú- og heimatænastuni verða fylgjandi tænastur veittar í februar 2024:*

- 80 borgarar fáa heimahjálp. 49 borgarar í norðaru helvt og 31 í sunnaru helvt.
- 112 borgarar ganga til heilsufimleik hjá Bú- & heimatænastuni. 27 í norðaru helvt og 85 í sunnaru helvt.
- Her skal leggjast aftrat, at Tvøroyrar kommuna hevur eitt tilboð, har borgarar í norðaru helvt ganga til heilsufimleik. Kvøldskúlin í Hvalbiar kommunu hevur eisini heilsufimleik, har borgarar í norðaru helvt luttaka.
- 47 borgarar fáa mat gjøgnum mattænastuna hjá Bú- og heimatænastuni. 25 borgarar í norðaru helvt og 22 í sunnaru helvt.
- 130 borgarar fáa blæur, bind v.m. gjøgnum Bú- og heimatænastuna. Búfólk á ellis- og røktarheimum og sambýlunum ikki tald við í teimum 130 borgarunum.
- 25 borgarar eru í dagtilhaldi hjá Bú- og heimatænastuni. 12 borgarar í sunnaru helvt og 13 í norðaru helvt. Nøkur luttaka hvønn dag, og nøkur luttaka ávísar dagar í vikuni.

## 9.3. Starvsfólk í Bú- og heimastænastuni

Talið av ársverkum í Bú- og heimatænastuni er knapt 122, meðan talið av starvsfólkum er 175 fólk, tí nógv starvsfólk arbeiða niðursetta tíð. Av teimum 175 fólkunum eru 20 menn, og miðalaldurin er úti við 50 ár.

Nógvir fakbólkar eru í Bú- og heimatænastuni. Størsti fakbólkurin er úr Heilsuhjálparafelag Føroya. Tað eru 75 fólk, sum fylla 49,2 ársverk. 17 sjúkrarøktarfrøðingar fylla 11,27 ársverk.

**TALVA 13:** ***Yvirlit yvir fakbólkar, apríl 2023***

| Fakbólkar | Starvsfólk | Ársverk |
|---|---|---|
| Heilsuhjálparafelag Føroya | 75 | 49,2 |
| Føroyskir Fysioterapeutar og Ergoterapeutar | 4 | 3,77 |
| Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar | 17 | 11,27 |
| Heilsurøktarafelagið | 57 | 44,48 |

*Kelda: BHS*

Sambært fyrrverandi stjóranum fyri Bú- og heimatænastuna hevur til tíðir verið trupult at fáa fakfólk í ymisku størvini – størvini eru tó í dag flestøll mannaði. Tað kann tó vera trupult at finna avloysarar.

Leggjast kann afturat, at Suðuroyggin er tað økið í landinum, sum hevur flest útbúgvið starvsfólk, her verður serliga hugsað um heilsuhjálparar og heilsurøktarar.

Nevnast kann tó eisini, at tað er trupult at fáa mannað størvini, sum eru til sjúkrarøktarfrøðingar inni á heimunum.

## 9.4. Fígging av Bú- og heimatænastuni

Tænasturnar og bútilboðini verða fíggjað partvís við játtan á fíggjarætlanini hjá kommununum og í minni mun við brúkaragjøldum.

Kommunurnar fáa á hvørjum ári inntøkur frá landinum í eftirlønarskatti og afturbering av serskattaskipanum.

Kommunur hava heimild til at seta meira játtan av til tænasturnar enn játtanin, sum landið letur teimum, og tær hava eisini heimild til at brúka part av játtanini, sum landið flytur teimum til annað virksemi.

Tað er, sum áður lýst, lógarásett, at tað skal gerast ein fíggjarætlan á hvørjum ári fyri hvørt samstarvsøki. Bú- og heimatænastan í Suðuroynni hevur onga fíggjarætlan.

Í §7 í løgtingslóg um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m. er ásett, at áðrenn einstøku kommunurnar gera uppskot til egna fíggjarætlan, skulu kommunurnar fáa uppskot til fíggjarætlan fyri kommunala samstarvið.

Soleiðis ber til hjá einstøku kommununum í samstarvinum at áseta sín part av samlaðu játtanini til samstarvið í kommunalu fíggjarætlanini, so at samsvar er millum fíggjarætlanirnar hjá einstøku kommununum og endaligu fíggjarætlanina hjá kommunala samstarvinum. Fíggjarætlanin hjá kommunala samstarvinum skal samtykkjast í stýrinum við vanligum meiriluta.

Samstarvið kann ikki átaka sær útreiðslu, uttan neyðug játtan er tøk. Stýrið kann tó, um neyðugt, veita eykajáttan, sum krevur tvær viðgerðir, har samstarvandi kommunurnar hava samtykt neyðuga eykajáttan millum 1. og 2. viðgerð í samstarvinum.

Teir kommunalu roknskapirnir vísa, at kostnaðurin av Bú- og heimatænastuni er hækkaður munandi síðani 2015, tá kommunurnar yvirtóku tænasturnar.

Kostnaðurin í 2015 var samanlagt 50,6 mió.kr, og í 2022 var kostnaðurin 65,1 mió.kr. Ein vøkstur á umleið 29%.

**TALVA 14:** ***Útreiðslur til eldraøkið (í 1.000 kr.), 2015-2022***

| Ár | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Eldraøkið** | **50.648** | **52.168** | **51.008** | **55.674** | **62.572** | **60.880** | **62.740** | **65.053** |

*Kelda: Kommunuroknskapir*

Kommunurnar býta henda kostnaðin millum sín sambært lutfallið av borgarum 67+ ár í kommununum.

Í talvu 15 sæst yvirlit yvir, hvussu nógv tær einstøku 7 kommunurnar hava rindað til Bú- og heimatænastuna í Suðuroynni síðani 2016.

**TALVA 15:** ***Útreiðslur til eldraøkið býtt á einstøku kommunurnar (í 1.000 kr.), 2016-2022***

| Ár | Tvøroyri | Hvalba | Fámjin | Porkeri | Hov | Vágur | Sumba |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2016 | 17.140 | 7.853 | 1.295 | 3.732 | 1.207 | 14.692 | 4.808 |
| 2017 | 17.373 | 7.365 | 1.462 | 3.527 | 1.148 | 14.916 | 4.498 |
| 2018 | 18.921 | 7.833 | 1.626 | 3.552 | 1.195 | 16.765 | 4.453 |
| 2019 | 21.829 | 8.404 | 2.229 | 3.685 | 1.278 | 18.304 | 4.958 |
| 2020 | 21.891 | 8.252 | 1.749 | 4.167 | 1.326 | 17.681 | 4.503 |
| 2021 | 22.507 | 8.534 | 1.925 | 4.471 | 1.365 | 18.125 | 4.364 |
| 2022 | 23.306 | 8.899 | 1.891 | 4.691 | 1.390 | 18.780 | 4.643 |

*Kelda: Kommunuroknskapir*

Í 2022 fóru umleið 25 prosent av inntøkunum hjá Tvøroyrar kommunu til at fíggja eldraøkið. Talið í Hvalbiar kommunu var á leið tað sama, men í Fámjins kommunu fóru 42 prosent av inntøkunum í 2022 til at fíggja eldraøkið.

Í talvunum niðanfyri eru útreiðslurnar í sambandi við eldraøkið fyri tær tríggjar kommunurnar lýstar nærri. Harumframt sæst eisini, hvussu nógv kommunurnar fáa flutt frá landinum, og hvør munurin er á útreiðslunum og flytingunum. Her sæst, at tað er serliga Fámjins kommuna, sum hevur havt stórar útreiðslur av Bú- og heimatænastuni, sum skulu rindast av skattainntøkunum hjá kommununi.

Í talvu 16 síggjast tøl fyri Tvøroyrar kommunu. Seinastu 8 árini hava útreiðslurnar hjá Tvøroyrar kommunu verið hægri enn flytingarnar í 5 av árunum, og samanlagt hesi árini hevur eldraøkið kostað kommununi umleið 1,85 mió.kr. meiri enn flytingarnar frá landinum.

**TALVA 16:** ***Útreiðslur og flytingar í sambandi við eldraøkið, Tvøroyrar kommuna, 2015-2022, í 1.000 kr.***

| Ár | Útreiðsla | Eftirlønarskattur | Afturbering – serskattaskipanir | Flyting samanlagt | Munur |
|---|---|---|---|---|---|
| 2015 | 16.531 | 10.401 | 4.972 | 15.373 | -1.158 |
| 2016 | 17.140 | 11.169 | 5.434 | 16.603 | -537 |
| 2017 | 17.373 | 12.331 | 5.439 | 17.770 | 397 |
| 2018 | 18.921 | 13.730 | 5.010 | 18.740 | -181 |
| 2019 | 21.829 | 15.917 | 4.779 | 20.696 | -1.133 |
| 2020 | 21.891 | 17.024 | 5.068 | 22.092 | 201 |
| 2021 | 22.507 | 17.492 | 4.977 | 22.469 | -38 |
| 2022 | 23.306 | 19.359 | 4.547 | 23.906 | 600 |

*Kelda: Kommunuroknskapir*

Hjá Hvalbiar kommunu hevur munurin millum útreiðslurnar og flytingina frá landinum hesi 8 árini samanlagt verið umleið 600 t.kr.

**TALVA 17:** ***Útreiðslur og flytingar í samband við eldraøkið, Hvalbiar kommuna, 2015-2022, í 1.000 kr.***

| Ár | Útreiðsla | Eftirlønar-skattur | Afturbering – serskattaskipanir | Flyting samanlagt | Munur |
|---|---|---|---|---|---|
| 2015 | 7.344 | 4.867 | 1.863 | 6.730 | -614 |
| 2016 | 7.853 | 5.140 | 2.138 | 7.278 | -575 |
| 2017 | 7.365 | 5.528 | 1.990 | 7.518 | 153 |
| 2018 | 7.833 | 5.891 | 1.807 | 7.698 | -135 |
| 2019 | 8.404 | 6.566 | 1.836 | 8.402 | -2 |
| 2020 | 8.252 | 6.621 | 1.682 | 8.303 | 51 |
| 2021 | 8.534 | 6.972 | 1.705 | 8.677 | 143 |
| 2022 | 8.899 | 7.768 | 1.521 | 9.289 | 390 |

*Kelda: Kommunuroknskapir*

Í talvu 18 síggjast tølini fyri Fámjins kommunu. Útreiðslurnar hava verið hægri, enn flytingarnar frá landinum øll árini.[3] Samanlagt hevur Fámjins kommuna goldið oman fyri 2,32 mió. kr. meiri fyri eldraøkið, enn kommunan hevur fingið frá landinum. Hjá eini lítlari kommunu er hetta ein eyka útreiðsla, sum rakar meint.

**TALVA 18:** ***Útreiðslur og flytingar í sambandi við eldraøkið, Fámjins kommuna, 2016-2022, í 1.000 kr.***

| Ár | Útreiðslur | Eftirlønar-skattur | Afturbering – serskattaskipanir | Flyting samanlagt | Munur |
|---|---|---|---|---|---|
| 2016 | 1.295 | 1.012 | 154 | 1.166 | -129 |
| 2017 | 1.462 | 1.063 | 90 | 1.153 | -309 |
| 2018 | 1.626 | 1.178 | 123 | 1.301 | -325 |
| 2019 | 2.229 | 1.399 | 142 | 1.541 | -688 |
| 2020 | 1.749 | 1.358 | 84 | 1.442 | -307 |
| 2021 | 1.925 | 1.514 | 61 | 1.575 | -350 |
| 2022 | 1.891 | 1.606 | 70 | 1.676 | -215 |

*Kelda: Kommunuroknskapir*

3 Eingi tøl eru tøk fyri 2015.

## 9.5. Framtíðartørvurin á eldraøkinum

Í hesum brotinum verður mett um, hvussu tørvurin á bú- og heimatænastuni broytist fram til 2035.

Tá talan er um smá tøl, kunnu árligu sveigginí sjálvsagt gerast stór, og hetta er eisini galdandi fyri smáu árgangirnar av íbúgvum í Suðuroynni.

Framskrivingarnar av tørvinum á búplássum og tænastum í heiminum eiga tí sjálvsagt at verða tiknar við neyðugum fyrivarni. Vert er tó at hava í huga, at hóast støddin á árgangunum sveiggjar nógv, er lítil og eingin til- ella fráflyting í hesum aldursbólkinum. Framskrivingar av støddini á eldra aldursbólkinum kunnu tí gerast við størri vissu, enn framskrivingar av yngru aldursbólkunum, har stórur partur av óvissuni stavar frá til- og fráflyting.

Tørvurin á búplássi er sjálvsagt vaksandi við aldrinum.

Í 2020 vóru 0,6 prosent av íbúgvunum í Suðuroynni í aldursbólkinum 67-74 ár í eldrabústaði. 2,3 prosent av aldursbólkinum 75-79 ár búðu í eldrabústaði, meðan prosentparturin av teimum í aldursbólkinum 80-84 ár var 15,2 prosent. (Hagstovan, 2024)

Flestu búfólkini eru í aldrinum 85+ ár, og her eru 30,3 prosent av íbúgvunum í aldursbólkinum í eldrabústaði.

Eftirspurningurin eftir heimahjálp í 2035 verður mettur við støði í aldursbýtinum á brúkarunum í Danmark í 2022.

Í fólkatalsframskrivingini liggur ein fortreyt um hækkandi livialdur. Nærliggjandi er tí eisini at áseta eina fortreyt um *heilsubetri aldurdóm*, t.e. at áralongdin, har fólk hava tørv á røkt, ikki leingist, hóast tey liva longri. Ítøkiliga merkir hetta, at hvørt fimta ár, gerast fólk eitt ár yngri í røktartørvi.

Hetta er sama fortreyt, sum m.a. verður nýtt í haldførisútrokningunum, og hevur hon stóran týdning fyri úrslitið, tá mett verður um framtíðartørvin á eldraøkinum. Við eini tílíkari fortreyt, hækkar framskrivaði tørvurin á búplássum í norðaru helvt 18,4 % komandi 11 árini, meðan tal av borgarum, sum fáa tænastur í heiminum, hækkar við 20% fram til 2035.

Uttan fortreytina um heilsubetri aldurdóm, verða hesi tølini ávikavist 42,1% og 42%, og sostatt hevur henda fortreytin stóran týdning í hesum útrokningunum.

Samstundis vísir fólkatalsframskrivingin, at talið av íbúgvum í aldursbólkinum 16-66 ár minkar við 18 prosentum fram til 2035. Sostatt verða kommunuskattainntøkurnar munandi lægri enn í dag, t.e. færri verða at rinda fyri vælferðartænastur.

Fólkatalsframskrivingin fyri alt landið, vísir tó einans eitt lítið fall í talinum av fólkum í hesum aldursbólkinum fram til 2035. Tað er hesin bólkurin, sum rindar samlaðu inntøkurnar av eftirlønarskattinum, sum kommunurnar í Suðuroynni fáa lut í.

Framskrivingarnar í hesi frágreiðing eru allar roknaðar við støði í tølum fyri alla Suðuroynna, og sostatt er gongdin í sunnaru helvt av oynni tann sama sum í norðaru helvt.

Tá talið av brúkarum økist lutfalsliga nógv komandi 11 árini, hevur hetta ikki einans við sær ein øktan rakstrarkostnað, men eisini verður neyðugt at gera íløgur í fleiri búpláss ella eldrabústaðir komandi árini.

Bú- og heimatænastan í Suðuroynni hevur upplýst, at eitt búpláss kostar 600-700 t.kr. árliga í rakstri. Umframt hetta kemur kostnaðurin av íløguni í fleiri búpláss.

Samanumtikið er Bú- og heimatænastan største útreiðsluøki hjá flestu kommununum.

Samstarvið um Bú- og heimatænastuna er merkt av avbjóðingum, eitt nú er eingin fíggjarætlan samtykt seinastu árini. Harumframt er verandi umboðan í samstarvinum ikki í javnvág við fólkatalið. Gjald og vald fylgjast ikki.

Framrokningin av fólkatalinum og býtinum millum fólk í arbeiðsførum aldri og eldra ættarliðinum vísir, at tað verður alsamt tyngri hjá kommununum at bera útreiðslurnar av Bú- og heimatænastuni í Suðuroynni.

Tað verður helst eisini ein avbjóðing at fáa nóg mikið av starvsfólkum til at arbeiða í Bú- og heimatænastuni.



# 10. Barnaverndartænastan í Suðuroynni

Í Suðuroynni er ein barnaverndartænasta, sum er eitt samstarv millum allar kommunurnar í oynni. Hvørt kommunustýri velur eitt umboð í eina barnaverndarnevnd. Barnaverndarnevndin er sett saman av fólki, sum hevur eina miðallanga útbúgving.

Barnaverndarnevndin tekur avgerðir í málum, um átøk skulu setast í verk. Tað er tó Føroya Kærustovnur, sum tekur avgerðir í málum um umsorganaryvirtøku.

Eitt umboð verður valt fyri hvørja kommunu í eina samstarvsnevnd, sum virkar sum eitt stýri. Henda samstarvsnevndin skipar umsitingina. Tvøroyrar kommuna er vertskommuna.

Umsitingin heldur til í hølum á Tvøroyri, og har starvast 7 fólk. Leiðari, skrivari, sálarfrøðingur, familjuráðgevi og tríggir málsviðgerðar /sosialráðgevarar.

Uppgávan hjá umsitingini er at fyrireika og málsviðgera øll barnaverndarmál.

**TALVA 19:** ***Virkin barnaverndarmál í % av barnatali, 2016-2022***

| | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Suðuroy** | 8,6 | 7,9 | 6,8 | 4,9 | 6,5 | 7,1 | 6,3 |
| **Alt landið** | 5,6 | 5,4 | 5,1 | 5,6 | 5,5 | 5,4 | 5,2 |

*Kelda: Frágreiðingar frá Barnaverndarstovu Føroya fyri árini 2016-2022.*

Sum talva 19 vísir, er tað ymiskt, hvussu stórur partur av samlaða barnatalinum í Suðuroynni er barnaverndarmál.

## 10.1. Fígging og kostnaður av barnavernd

Barnaverndarlógin ásetir, at kommunurnar bera kostnaðin av tí fyribyrgjandi partinum av barnaverndarøkinum, og tá børn verða sett til fosturs, meðan landið ber útreiðslurnar, tá børn verða umsorganaryvirtikin og fara á viðgerðarstovn.

Kommunurnar rinda tó eitt brúkaragjald. Harumframt rindar landið ein árligan stuðul til Barnahúsið og fyri útreiðslur í sambandi við ókeypis advokatumboðan.

Samlaða útreiðslan til barnavernd í Føroyum í 2022 var umleið 131 mió. kr. Útreiðslan hjá kommununum var samanlagt góðar 85 mió. og hjá landinum knappar 46 mió. Kommunurnar bera sostatt umleið tveir triðingar av útreiðslunum á barnaverndarøkinum, meðan landið ber ein góðan triðing.

Samlaðu útreiðslurnar hjá kommununum í Suðuroynni av barnaverndarøkinum vóru 8,5 mió. kr. í 2022.

Sambært § 68, stk. 2 í barnaverndarlógini skulu kommunur í samstarvinum býta útreiðslurnar svarandi til fólkatalið í kommununi.

**TALVA 20:** ***Útreiðslur til barnaverndarøkið, í mió. kr., 2016-2022***

| | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Suðuroy** | 5,5 | 5,4 | 5,5 | 5,8 | 7,7 | 8,9 | 8,5 |

*Kelda: Frágreiðingar frá Barnaverndarstovu Føroya fyri árini 2016-2022.*

Sum víst omanfyri, hækkar kostnaðurin nógv onkur ár og lækkar eitt vet onnur ár. Ein orsøk til sveiggini kann vera, at kostnaðarmikil mál taka seg upp í fíggjarárinum, ella at eitt kostnaðarmikið mál er endað, annaðhvørt tí at familjan flytir, ella at barnið er blivið 18 ár.

Í talvuni niðanfyri sæst, hvussu nógv einstøku kommunurnar hava goldið inn í samstarvið. Samanlagt rindaðu hesar tríggjar kommunurnar 4,6 mió. kr. í 2022. Hetta svarar til 54% av samlaða kostnaðinum hetta árið.

**TALVA 21:** ***Goldið inn í samstarvið um barnavernd, í 1000 kr., 2016-2022***

| | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fámjins kommuna** | 125 | 111 | 98 | 125 | 128 | 152 | 140 |
| **Tvøroyrar kommuna** | 2.332 | 2.345 | 2.163 | 2.788 | 2.971 | 3.411 | 3.246 |
| **Hvalbiar kommuna** | 979 | 924 | 842 | 1.081 | 1.099 | 1.269 | 1.221 |

*Kelda: Kommunuroknskapir*

Í Tvøroyrar kommunu svarar kostnaðurin av barnaverndarøkinum til góð 4% av samlaðu útreiðslunum hjá kommununi. Í Hvalbiar kommuni er hetta næstan 5% og í Fámjin góð 2 prosent.



# 11. Avbjóðingar hjá verandi kommunum og Suðuroynni

Øll tøl vísa, at Suðuroyggin er í eini truplari støðu, sum bara verður verri, um einki verður gjørt.

Haldføristrupulleikin er størri í Suðuroynni enn í restini av landinum. Hóast fólkavøksturin hevur verið stórur samanlagt í Føroyum seinastu 10 árini, er fólkatalið minkað í Suðuroynni. Minkingin er grundað á fólkafráflyting og lægri burðartal. Hetta merkir, at tey eldru eru ein lutfalsliga størri partur av fólkinum, meðan tey í arbeiðsførum aldri og børnini eru lutfalsliga færri í tali.

Samanumtikið er eingin ivi um, at neiliga gongdin í fólkatalinum og aldurssamansetingini er partur av stóru avbjóðingini hjá Suðuroynni. Verða kommunurnar lagdar saman, verða framhaldandi somu stóru avbjóðingar í fólkatalinum og aldursbýtinum, har trupulleikin verður, at færri skulu rinda fyri fleiri.

Samstundis eru fleiri avbjóðingar viðvíkjandi arbeiðsmarknaðinum í Suðuroynni samanborið við restina av landinum. Ein minni partur av íbúgvunum eru í starvi ella starvssøkjandi. Harumframt er arbeiðsloysið hægri enn í restini av landinum, og serliga er talið av langtíðararbeiðsleysum høgt í Suðuroynni.

Greitt er, at landið má gera átøk fyri at loysa framtíðar avbjóðingar hjá kommununum og Suðuroynni. Eins greitt er, at kommunurnar mugu taka ábyrgd og gera sítt til at standa ímóti avbjóðingunum. Ein samanlegging av kommununum í norðaru helvt loysir ikki allar avbjóðingar hjá Suðuroynni, men vísir ein vilja til at taka neyðug stig og líta frameftir.

Suðuroyggin er í eini serstøðu, tá tað kemur til fjarstøðu og ferðasamband við meginøkið. Oyggin er tann einasta stóra oyggin, sum eftir er, ið ikki hevur fast samband, og haraftrat er ferðasambandið óstøðugt.

Í løtuni verður arbeitt við at fyrireika ein Suðuroyartunnil. Jarðfrøðiligu kanningarnar verða helst lidnar í 2024, og ætlanin er, at uppskot til ein fíggingarleist verður klárt í 2024. Búskaparráðið og onnur hava alment ávarað ímóti at gera so stóra íløgu í Suðuroyartunnil, meðan onnur vísa á, at Suðuroyartunnilin er ein neyðug íløga, um gongdin skal vendast.

Í 2019 varð »Álit um møguleikar, fyrimunir og vansar við einum Suðuroyartunnli« handað landsstýrismanninum við samferðslumálum.

Í álitinum verður víst á, at tað er trupult at siga nakað eintýðugt um, hvussu fast samband við eitt meginøki ávirkar hugin at seta búgv og trivnaðin í einum útjaðara. Royndir bæði í Føroyum og uttanlands vísa at tað er ymiskt. Í Vágoynni hevur verið ein javnur vøkstur síðani tunnilin kom í 2002, meðan gongdin í fólkatalinum í Norðuroyggjum, sum fingu fast undirsjóvarsamband í 2006, hevur verið tann sama, sum í landinum samanlagt.

Í álitinum verður eisini víst á, at møguleikin at flyta seg ímillum øki, skapar ikki av sær sjálvum økt fólkatal. Ofta eru onnur atlit, t.d. bústaðarmøguleikar, vælferðartænastur, trivnaðartilboð og starvsmøguleikar, sum hava størri týdning fyri, hvar man velur at seta búgv. Sum útgangsstøði kann tó sigast, at fast samband hevur við sær ein størri arbeiðsmarknað og størri útboð av arbeiðsmegi, eins og tað kann geva nýggjar møguleikar at velja sær bæði starvsleið og heimstað, tá man kann arbeiða eitt stað og búgva eitt annað.

Í álitinum »Heildarætlan – fólkaflyting og fólkavøkstur« frá 2013 eru nógv og ymisk tilmæli um, hvussu land, kommunur, vinnan og hvør einstakur kunnu vera við til at skapa fólkavøkstur í Føroyum og fáa yngri fólk at velja Føroyar.

Víst verður eisini á, at føroyingar í og uttanfyri Føroyar taka avbjóðingina við fólkaflyting í størsta álvara og vilja, at tiltøk skulu gerast fyri at fáa fólkavøkstur í Føroyum. Valdið at taka tær stóru avgerðirnar liggur hjá leiðsluni her á landi, men ábyrgdin liggur bæði hjá tí almenna, vinnuni og hjá hvørjum einstøkum føroyingi. Harafturat verður víst á, at neiligur hugburður og vantandi álit á Føroyar sum land at virka og liva í er ein sera týðandi – og higartil undirmettur partur av minkingini í fólkatalinum í Føroyum.

Suðuroyggin hevur nógv at bjóða og her eru ótroyttir møguleikar.

Suðuroyingar mugu tó gera sær greitt, at skal oyggin vera kappingarfør, er neyðugt at vit taka avbjóðingarnar í álvara og sjálv taka stig til at fremja átøk og broytingar. Hetta snýr seg um alt frá kommunusamanlegging, starvs- og bústaðarmøguleikum til fjølbroytt skúlatilboð.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at kommunurnar saman við landsmyndugleikunum og umboðum fyri vinnuna og borgarar taka stig til at gera eina heildarætlan fyri, hvussu gongdin í fólkatalinum í Suðuroynni kann broytast og hvussu kommunurnar, landið, vinnan og borgarar hvør í sínum lagi og saman kunnu venda gongdini.



## 12. Hvussu kann ein samanlegging fremjast?

Kommunustýrini hava heimild til at leggja kommunurnar saman sambært løgtingslóg um sjálvbodna kommunusamanlegging. Bara samdar kommunur kunnu leggjast saman, og landsstýrisfólkið við kommunumálum skal góðkenna samanlegging eftir nærri ásetingum.

### *Áðrenn landsstýrisfólkið góðkennir avtalu um kommunusamanlegging, skal semja vera um:*

- **heitið á kommununi, har orðið kommuna skal vera partur av heitinum**
- **staðseting av kommunustýrinum**
- **mannagongd um samanlegging av fyrisiting**
- **uppgerð av ognar- og fíggjarviðurskiftum**
- **tíðarfesting um, nær samanlegging skal vera fullførd**
- **um staðbundnar nevndir skulu verða settar**

Kommunustýrini kunnu leggja málið um samanlegging fyri vegleiðandi fólkaatkvøðu. Tað er ikki krav, at kommunustýrini fylgja úrslitinum av fólkaatkvøðuni.

Galdandi lóg um kommunusamanlegging ásetir einki ítøkiligt um leistin fyri samanlegging av kommunum.

Arbeiðsbólkurin metir, at samanleggingartilgongdin eigur at verða neyvt fyrireikað og framd við atliti at fólkarræðnum, fíggjarviðurskiftunum og fyrisitingarligu viðurskiftunum í teim einstøku kommununum.

Er ætlanin at leggja kommunurnar saman í sambandi við komandi kommunuval, sum verður í novembur í ár, er alneyðugt at arbeitt verður miðvíst og skjótt víðari við samanleggingini.

Havast skal í huga, at vallistar skulu vera gjørdir í seinasta lagi 1. september í tí ári, sum valið fer fram, og at valkort skulu verða send út til veljarar seinasta lagi tvær vikur undan valinum.

Fyrsta og avgerandi stigið í eini samanleggingartilgongd er, at verandi kommunustýri taka undir við samanlegging og samtykkja hana á kommunustýrisfundi.

Hetta merkir m.a. eisini, at kommunurnar binda seg til ikki at fara undir nýggjar, stórar íløgur, sum koma at binda fíggjarliga rásarúmið hjá eini komandi kommunu.

Kommunustýrini skulu samstundis taka støðu til, um vegleiðandi fólkaatkvøða skal verða.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at eitt ítøkiligt uppskot til ein samanleggingarsáttmála fyriliggur, áðrenn spurningurin verður sendur til fólkaatkvøðu.

Tað hava verið fleiri fólkaatkvøður gjøgnum árini, eisini í Suðuroynni. Skal nakað veruligt spyrjast burturúr, er neyðugt, at tað er greitt fyri borgarar í teimum trimum kommununum, hvat ein samanlegging kemur at merkja, og hvussu ein nýggj kommuna ætlandi verður skipað, soleiðis at borgarin veit, hvat atkvøðast skal um.

***Tí verður mælt til, at eitt ítøkiligt uppskot til sáttmála um sjálvbodna kommunusamanlegging verður gjørt, sum fevnir um fylgjandi viðurskifti:***

- **Heitið á nýggju kommununi**
- **Hvussu býráðið verður skipað bæði við tali av limum, nevndum og møguligum staðbundnum nevndum.**
- **Hvussu ognarviðurskiftini verða avgreidd**
- **Hvussu og hvar umsitingin í nýggju kommuni verður skipað**
- **Hvussu starvsfólkaviðurskiftini verða avgreidd í sambandi við samanleggingina**
- **Hvussu journalskipan og aðrar skipanir skulu skipast**
- **Atkvøðuøkið í sambandi við kommunuval**
- **Spurningurin um valnevnd má avgreiðast**

Ein nágreinilig tíðarætlan skal fyriliggja. Tíðarætlanin er treytað av, hvussu skjótt avgerðin hjá kommunustýrunum verður tikin. Ein fyritreyt er, at allar kommunurnar taka lut í tilgongdini og seta neyðuga orku av til tess.

Týdningarmikið er, at allar kommunurnar hava eigarakenslu í tilgongdini. Eins týdningarmikið er, at borgararnir fáa eina greiða kunning og møguleikar at seta spurningar, soleiðis, at tey kenna seg før fyri at taka eina avgerð í eini møguligari fólkaatkvøðu.

# 13. Nýggja kommunan í norðaru helvt

Í hesum kapitlinum verður ein samanløgd kommuna viðgjørd við atliti at teimum økjum, sum eru greinað í undanfarnum kapitlum.

## 13.1. Fíggjarstøðan hjá nýggju kommununi

Sum lýst í kap. 5, er fíggjarstøðan í teimum trimum kommununum rættiliga lík á nógvum økjum, og er hetta ein greiður fyrimunur, um kommunurnar verða lagdar saman.

Nettoskuldin pr. íbúgva er endurgivin í talvu 22 niðanfyri. Her sæst, hvussu nettoskuldin pr. íbúgva broytist, um farið verður frá núverandi trimum kommunum og til eina samanlagda kommunu. Talan er um eina lítla hækking fyri borgarar í Tvøroyrar kommunu meðan nettoskuldin fyri hvønn íbúgva verður eitt vet lægri fyri borgarar í Hvalbiar kommunu. Nettoskuldin fyri hvønn borgara lækkar.

**TALVA 22:** ***Nettoskuld pr. íbúgva í einstøku kommununum og samanlagt, í 1.000 kr., 2022***

| | Fámjin | Hvalba | Tvøroyri | Samanløgd kommuna |
|---|---|---|---|---|
| **Nettoskuld pr. íbúgva** | **28,3** | **23,1** | **21,5** | **22,1** |

*Kelda: Hagstovan*

Kommunurnar eru tó ymiskar, tá hugt verður eftir skattaprosentunum. Skattaprosentið í Fámjins kommunu er munandi lægri enn í hinum báðum kommununum, og tí eru kommunuskattainntøkurnar pr. íbúgva eisini lægri í Fámjin.

Verða kommunurnar lagdar saman, verður talan um eina fíggjarliga eind við felags skattaprosenti, barnafrádrátti, o.s.fr. Tað verður ein uppgáva hjá nýggja kommunustýrinum at áseta hesi.

Skal kommunuskattainntøkan fyri eina samanlagda kommunu verða tann sama sum í 2022, skal skattaprosentið vera 20,65%.

Sum dømi kann nevnast, at lækkar skattaprosentið niður á 19,5%, hevur hetta við sær eina lækking í skattainntøkunum á umleið 7 mió. kr., við støði í 2022 tølum.

Um skattaprosentið í eini samanlagdari kommunu verður 20,65%, verður skattaprosentið nærum óbroytt fyri borgarar í Hvalbiar kommunu og eitt vet lægri fyri borgarar í Tvøroyrar kommunu og munandi hægri fyri borgarar í Fámjin. Nettoskuldin í Fámjin hevur tó verið vaksandi seinastu árini. Hetta kundi bent á, at uttan kommunusamanlegging, verður eisini neyðugt at hækka kommunskattaprosentið í Fámjin, skal kommunan klára at røkja sínar skyldur framyvir.

Nettoskuldin í eini samanlagdari kommunu hevði verið 36,75% av roknaðu inntøkuni í 2022. Sí talvu 23. Ein álíkning hevði tá verið omanfyri 150 mió. kr., og sostatt eru fleiri møguleikar fyri at gera neyðugar framtíðar-íløgur.

Samanumtikið er nýggja kommunan ein sterkari fíggjarlig eind, enn tær tríggjar kommunurnar hvør sær. Hetta er eisini ein eind, sum er betri fyri at lofta teimum stóru avbjóðingunum, sum eru við fólkasamansetingini og fráflytingini í Suðuroynni.

**TALVA 23:** ***Uppgerð fyri eina samanlagda kommunu við støði í 2022 tølum***

| Uppgerð av nettoskuld í 1.000 kr. (2022) | Samanlagt |
|---|---|
| Skattaprosent | 20,65 |
| Skattainntøka | 136.287 |
| Umroknað til 23% | 151.762 |
| Gjaldføri | 11.905 |
| Langfreistað skuld | - 75.408 |
| Debitorar | 18.200 |
| Stuttfreistað skuld | - 10.466 |
| Nettoskuld | - 55.769 |
| Nettoskuld í prosent av roknaðari inntøku | 36,75 |
| Munur á álíkning og skuld | 95.993 |

## 13.2. Umboðanin í nýggju kommununi

Sambært kommunustýrislógini skulu verða millum 7 og 17 kommunustýrislimir í nýggju kommununi.

Sum er, eru kommunurnar skipaðar soleiðis, at Tvøroyrar kommuna og Hvalbiar kommuna hava báðar 7 limir, og Fámjin hevur tríggjar.

Arbeiðsbólkurin metir, at 9 ella 11 kommunustýrislimir er hóskandi í nýggju kommununi.

Í flestu kommununum, sum samanlagda kommunan kann samanbera seg við, eru 11 kommunustýrislimir, t.e. Runavíkar kommuna, Vága kommuna, Sunda kommuna og Klaksvíkar kommuna. Eysturkommuna hevur 9 kommunustýrislimir.

**TALVA 24:** ***Atkvøður pr. bý- og bygdaráðslim, januar 2024***

| | Íbúgvar 18+ ár | Bý- og bygdaráðslimir | Atkvøður pr. bý- og bygdaráðslim |
|---|---|---|---|
| Hvalbiar kommuna | 504 | 7 | 72 |
| Tvøroyrar kommuna | 1367 | 7 | 195 |
| Fámjins kommuna | 72 | 3 | 24 |
| Samanløgd kommuna | 1943 | 9 | 216 |
| Samanløgd kommuna | 1943 | 11 | 177 |

Fyri allar kommunurnar kemur ein samanlegging at merkja eina minni ávirkan í mun til umboðanina, um sett verður sum fortreyt, at 9 ella 11 býráðslimir verða í nýggju kommununi.

Í dag er býráðið í Tvøroyrar kommunu samansett av 7 limum. Hetta svarar til 195 atkvøður pr. valdan býráðslim.

Í bygdaráðnum í Hvalbiar kommunu eru í dag 7 limir, t.e. 72 atkvøður pr. bygdaráðslim.

Sum minsta kommuna í eini samanlegging, kemur Fámjin at missa størstu ávirkanina. Í dag eru tríggir limir í bygdarráðnum t.e. 24 atkvøður pr. lim.

Verður nýggja kommunustýrið mannað við 9 limum, svarar tað til 216 atkvøður fyri hvønn valdan býráðslim. Verður nýggja kommunustýrið mannað við 11 limum, svarar tað til 177 atkvøður fyri valdan býráðslim. Borgarstjórin skal sita í fulltíðarstarvi.

Sambært kommunustýrislógini skal støða takast til, um staðbundnar nevndir skulu skipast. Uppgávan hjá staðbundnu nevndini er at veita kommununi ráðgeving um mál viðv. lokalum viðskiftum.

Endamálið við staðbundnum nevndum er at geva borgarunum í teimum minni kommununum eitt forum at bera síni sjónarmið fram og vísa á ymisk viðurskifti í teimum lokalu økjunum.

Ein samanløgd kommuna í norðaru helvt av Suðuroynni er rættiliga samansett. Tí kann tað verða ein skilagóð loysn at hava staðbundnar nevndir í Fámjin og í Hvalbiar sókn. Verða staðbundnar nevndir skipaðar, er av týdningi, at tær verða brúktar.

Staðbundnu nevndirnar verða valdar, tá býráðsval er. Nevndirnar kunnu hava 3 lokal umboð, eitt umboð valt millum býráðslimirnar, og borgarstjórin er fastur formaður í alt 5 umboð.

Støða skal takast til, hvussu nógvar nevndir nýggja kommunan skal hava. Smb. kommunustýrislógini skal fíggjarnevnd vera, og ein ella fleiri fastar nevndir til fyrisiting av kommunalum viðurskiftum.

Tvøroyrar kommuna hevur í dag 6 nevndir: Fíggjarnevnd, vinnu- og havnanevnd, mentanarnevnd, trivnaðar- og umhvørvisnevnd, sosiala nevnd og tekniska nevnd.

Hvalbiar kommuna hevur 4 nevndir: Fíggjarnevnd, trivnaðarnevnd, tekniska nevnd og vega- og havnanevnd.

Fámjin hevur onga nevnd.

Uttan mun til, hvørjar nevndir verða í nýggju kommununi, er týdningarmikið, at trivnaður og mentan verða raðfest ovarlaga. Týdningarmikið er, at dentur verður lagdur á at varðveita og stuðla teimum lokalu tiltøkunum, sum verða fyriskipað.

## *Umboðanin í samstørvuunum í Bú- og heimatænastuni og barnaverndini*

Verða kommunurnar lagdar saman, verður umboðanin hjá nýggju kommununi verri í stýrinum fyri Bú- og heimatænastu og samstarvsnevndini og barnaverndarnevndini. Tær tríggjar kommunurnar fara frá at hava fýra limir í stýrinum fyri Bú- og heimatænastuna til at hava tríggjar. Kommunurnar í sunnaru helvt koma framhaldandi at hava fimm limir. Ein samanlegging hevur tí við sær, at umboðanin hjá kommununum minkar til tríggjar av átta limum, t.e. 37,5%. Í dag er umboðanin 44%.

Í dag hava kommunurnar hvør sítt umboð í bæði samstarvs- og barnaverndarnevndini. Nýggja kommunan hevði einans fingið eitt umboð av fimm.

### *Umboðan í interkommunalum felagsskapum*

Kommunurnar eru eisini limir í interkommunalum felagsskapum og hava umboðan og atkvøðurætt. Interkommunalu felagsskapirnir eru Føroya kommunufelag, IRF og SEV.

Í Kommunufelag Føroya hevur hvør kommuna atkvøður eftir íbúgvaratalinum, og hevur ein kommunusamanlegging ikki nakrar broytingar við sær í umboðan og valdsbýti.

Í IRF skal ein nevnd veljast við 6 limum, sum eru kommunustýrislimir og sita fyri eitt valskeið ísenn. Suðuroyggin hevur eitt umboð í stýrinum fyri IRF. Ein kommunusamanlegging ávirkar ikki umboðanina hjá norðaru helvt, tí atkvøtt verður eftir fólkatalinum.

Í SEV verður nevnd vald við sjey limum. Suðuroyggin hevur ein. Kommunurnar í Suðuroynni hava eina atkvøðu fyri hvørt byrjað 1000 íbúgvaratal. Ein kommunusamanlegging merkir, at norðara helvt missir eina atkvøðu. Í heila tikið er av alstórum týdningi, at tann samanlagda kommunan varðveitir tann identitetin, sum tær einstøku kommunurnar hava.

## 13.3. Umsitingin í nýggju kommununi

Tann samanlagda kommunan skal hava eina felags umsiting, og støða skal takast til, hvussu umsitingin í nýggju kommununi skal skipast.

Í sambandi við samanlegging av kommunum verður ofta víst til, at umsitingin verður bíligari, og at borgarin fær eina meira fakliga umsiting, og at tænasturnar verða betri og effektivari.

Sum er í dag, hava Fámjin og Hvalba avmarkaða umsiting, meðan Tvøroyri hevur eina fíggjardeild, eina tekniska deild og eina trivnaðardeild. Á býráðsskrivstovuni á Tvøroyri eru 9 starvsfólk. Tvøroyrar kommuna hevur í dag ein kommunustjóra í fullum starvi, meðan Fámjin og Hvalba hava kommunuskrivarar. Samlaður útreiðslurnar til umsiting hjá teimum trimum kommununum vóru í 2022 umleið 13 mió.kr.

Ein samanlegging merkir ikki í sjálvum sær, at fyrisitingin verður bíligari, ella at størv verða niðurløgd. Hetta veldst um, hvussu fyrisitingin verður skipað og um verandi størv halda fram í nýggju kommununi. Kommunustýrislimirnir verða tó færri í tali, og tað verður bert ein borgarstjóri.

Krøvini til almennar fyrisitingar gerast alsamt størri. Borgarin er vorðin meira tilvitaður um sína rættarstøðu, og seta tí eisini størri krøv til, at umsóknir og klagur verða viðgjørdar sambært galdandi lóggávu. Hetta setir krøv til at fyrisitingin hevur neyðugar fakligar førleikar.

Arbeiðsbólkurin metir, at ein nýggj kommuna eigur at hava ein kommunustjóra í fullum starvi. Harumframt eigur nýggja kommunan at hava eina fíggjardeild, eina tekniska deild og eina trivnaðardeild.

Hetta merkir, at fyri borgarar í Fámjin og Hvalbiar kommunu verður umsitingin størri enn í dag, meðan borgarar í Tvøroyrar kommunu ikki koma at merkja stórvegis broytingar. Ein vansi við størri umsiting kann vera, at borgarin fær ta fatan, at størri fjarstøða verður til tey, sum taka avgerðir, og at leiðin til kommununa verður truplari.

Ein sterkari umsiting er ein javnvigan av, at umsitingin verður meira faklig, at munur ikki verður gjørdur á borgarum, at avgerðir verða grundaðar á galdandi reglugerðir, og at demokratiið verður virt. Krøv til fyrisitingarligar førleikar kunnu eisini gera tað lokkandi hjá fólki bæði at søkja størv og velja Suðuroynna sum bústað.

Sambært lógini um sjálvbodna kommunusamanlegging skal avgerð takast um, hvar framtíðar umsitingin skal vera, tá talan er um samanleggingar av kommunum. Natúrligt er, at fyrisitingin hjá nýggju kommununi verður á Tvøroyri. Vísandi til, at íløgur eru gjørdar í nýggjan tunnil millum Hvalba og Tvøroyri og millum Fámjin og Tvøroyri metir arbeiðsbólkurin ikki, at fjarstøðan verður ein trupulleiki. Harafturat verða alsamt fleiri mál, sum eru millum borgarar og kommunurnar, avgreidd talgilt.

## 13.4. Skipan av skúlunum í nýggju kommununi

Sambært fólkaskúlalógini er tað kommunan, sum ger av, hvussu skúlin verður skipaður í sambandi við eina kommunusamanlegging. Kommunustýrið kann velja at varðveita verandi skúlabygnað við trimum sjálvstøðugum skúlum og kann eisini gera av, at skúlar skulu niðurleggjast ella leggjast saman.

Skulu skúlar niðurleggjast, er neyðugt at kunngera avgerðina í føroysku fjølmiðlunuml. Atkvøðugreiðsla verður hildin, um í minsta lagi 30% av íbúgvunum í viðkomandi skúladømi, ið hava valrætt til kommunustýrið, koma við skrivligari áheitan um atkvøðugreiðslu. Verður úrslitið av atkvøðugreiðsluni, at í minsta lagi 50% av teimum, ið hava atkvøtt, ynskja at varðveita skúlan, verður hann varðveittur.

Skúlarnir kunnu eisini leggjast saman til ein myndugleika við einari leiðslu. Áðrenn støða verður tikin til skúlasamanlegging, skulu skúlastýrini hoyrast, og kommunan skal skipa fyri almennum fundi/borgarafundi, har kunnað verður um samanleggingina.

Vísandi til gongdina í barnatalinum, verandi barnatal og framtíðarútlitini fyri barnatalinum í teimum trimum kommununum, vísir arbeiðsbólkurin á, at neyðugt er at gera broytingar í skúlabygnaðinum í teimum trimum kommununum, óansæð samanlegging av kommunum ella ikki.

### *Gongdin í næmingatalinum*

Fallandi fólkatal, ein lutfalsliga minni partur av íbúgvunum í burðarførum aldri og eitt lægri burðartal hava við sær, at talið av børnum í skúlunum er stórliga minkað seinastu árini.

Hetta sæst greitt í mynd 16 niðanfyri, sum vísir børn í skúlaaldri (7-15 ár) fyri tíðarskeiðið 1985-2022. Myndin vísir sostatt 9 árgangir.

Niðurgongdin í næmingatalinum samanlagt fyri allar kommunurnar er 40% hesi árini frá 1985 til 2022.

**MYND 16:** ***Fólk í aldursbólkinum 7-15 ár, 1985-2022***




*Kelda: Hagstovan*

Verður hugt eftir gongdini síðan ár 2000 sæst, at minkingin í Tvøroyrar kommunu hevur verið 20 prosent. Í Hvalbiar kommunu var minkingin hetta tíðarskeiðið oman fyri 38 prosent.

Samanlagt fyri allar tríggjar kommunurnar er talið av børnum í skúlaaldri minkað við 27 prosentum síðan ár 2000.

Talva 25 niðanfyri vísir, hvussu nógvir næmingar væntandi byrja í 1. flokki komandi árini. Her er als eingin ivi um, at serliga árgangirnir í Hvalbiar skúla verða sera smáir komandi árini.

**TALVA 25:** ***Fólkatalið 1. januar 2023 í aldrunum 0-6 ár***

| | Hvalba | Tvøroyri | Fámjin | Samanlagt |
|---|---|---|---|---|
| **0 ár** | 6 | 13 | 1 | 20 |
| **1 ár** | 4 | 20 | 1 | 25 |
| **2 ár** | 7 | 24 | 0 | 31 |
| **3 ár** | 7 | 22 | 0 | 29 |
| **4 ár** | 8 | 14 | 0 | 22 |
| **5 ár** | 7 | 19 | 0 | 26 |
| **6 ár** | 13 | 26 | 0 | 39 |

*Kelda: Hagstovan*

Framskrivingarnar av fólkatalinum benda á, at talið av kvinnum í burðarførum aldri eisini fer at minka komandi árini, og hetta fer at hava við sær eitt fallandi barnatal.

Framskrivingarnar benda á, at í 2040 verða 12 prosent færri børn í skúlaaldri, enn tað eru í dag, og í 2050 er fallið heili 23 prosent.

## *Tilmæli um ein nýggjan skúlabygnað*

Øll tøl og framrokningar vísa, at okkurt má gerast við skúlaøkið, tí gongdin talar sítt egna mál.

Fyri heilt stuttum vóru tríggir skúlar í norðaru helvt. Í dag eru bert tveir skúlar, og við verandi gongd minka báðir so nógv, at spurningurin er, um skúlarnir megna at liva upp til tey krøv, sum samfelagið setir til ein skúla í dag.

Við støði í omanfyri lýsta, metir arbeiðsbólkurin ikki, at samstarv millum skúlarnir er nóg mikið. Tað er neyðugt, at skúlarnir, so ella so, verða lagdir saman.

Verða skúlarnir á Tvøroyri, Fámjin og Hvalba lagdir saman, verður samlaða næmingatalið 272. Talan verður sostatt ikki um ein stóran skúla, samanborið við aðrar skúlar í landinum. Sambært Undirvísingarstýrinum verður talan um ein miðal skúla við eini hóskandi støðd, sum gevur fleiri og betri møguleikar enn verandi skipan.

Eitt hægri næmingatal tryggjar í størri mun, at næmingar sleppa undan at verða undirvístir saman við øðrum árgangum.

Harumframt kann skúlin geva fleiri fjøltáttaði undirvísingartilboð, har størri atlit verða tikin til ymisku næmingarnar. Skúlin kann eisini hava eina tvílæruskipan, sum í størri mun kann lofta næmingum námsfrøðiliga og sosialt, tí lærari og námsfrøðingar undirvísa sama flokki.

Á fundi við leiðslurnar í Tvøroyrar og Hvalbiar skúla í novembur 2023 varð kjakast um fyrimunir og vansar við verandi skúlum og einum møguliga samanløgdum skúla. Á fundinum varð ført fram, at ein samanlagdur skúli gevur næminginum eitt betri tilboð, eins og skúlarnir og lærararnir "kunnu brúka styrkina hjá hvørjum øðrum."

Skúlin hevur grundleggjandi týdning fyri lokaløkið og er savningarstaður hjá næmingum og lærarum. Skúlin myndar eisini framtíðina hjá kommunala felagsskapinum, og tí er skilagott at varðveita skúlarnar.

Tó er neyðugt at taka støði í framrokningum og tørvinum hjá næminginum, soleiðis, at framtíðar-skúlin í norðaru helvt verður eitt skúlaøki við einari leiðslu.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at nýggja kommunustýrið tekur stig til at leggja skúlarnar saman undir eina leiðslu, og at árgangirnar verða savnaðir soleiðis, at undirvísing heldur fram í verandi skúlum.

Um hugt verður eftir 1. flokki til og við 7. flokk, so eru í dag 62 næmingar í Hvalba og 149 næmingar á Tvøroyri. Verða hesir flokkar lagdir saman á einum staði, gevur hetta samlað 211 næmingar.

Í framhaldsdeildini ganga í dag í Hvalbiar skúla 17 næmingar og 44 næmingar í Tvøroyrar skúla. Í eini samanlegging verða í alt 61 næmingar í framhaldsdeildini.

Ein møguleiki kundi verið, at 1. til og við 3. flokkur ganga í Hvalbiar skúla, meðan 4. til og við 10. flokk ganga á Tvøroyri. Annar møguleiki er, at gjørt verður øvugt.

Sum kunnugt eru tríggir skúlar og vildi tað verið skynsamt at savna næmingar og lærarar í tveimum skúlum. Arbeiðsbólkurin hevur ikki neyvt innlit í standin á skúlunum, ella um skúlarnir hava neyðugar serstovur v.m. Skúlaleiðslurnar í Hvalba og á Tvøroyri hava víst á, at skúlin í Hvalba og skúlin í Trongisvági eru í góðum standi, meðan skúlin á Tvøroyri treingir til stórar og kostnaðarmiklar ábøtur.

Tí er ein møguleiki, at undirvísingin verður í Hvalba og skúlanum í Trongisvági, sum liggur mitt í nýggju kommununi, og sum er partur av einum vælútbygdum ítróttarøki og tí ein natúrligur savningarstaður fyri børn og ung í økinum.

Ein vansi við samanlegging av skúlunum á Tvøroyri, Fámjin og Hvalba kann vera flutningurin av børnum til og frá skúlunum.

Tilmælta loysnin krevur, at øll skulu flyta seg. Vísandi til, at nýggjur tunnil er millum Hvalba og Tvøroyri og at tunnilin millum Fámjin og Tvøroyri verður liðugur skjótt, eigur frástøðan ikki at verða ein trupulleiki.

Tað er tó umráðandi, at kommunustýrið raðfestir fast og regluligt busssamband til og frá skúlunum. Eitt slíkt busssamband er eisini við til at samansjóða økini, og stuðlar upp undir annað mentanar- og frítíðarvirksemi aftan á skúlatíð hjá børnum og ungdómi í norðaru helvt.

Viðmerkjast skal, at býráðið á Tvøroyri hevur samtykt, at nýggjur skúli skal byggjast á Tvøroyri. Arbeiðsbólkurin leggur seg ikki út í henda politiska spurning, men vil vísa á, at tað er sera umráðandi, at henda ætlan verður hugsað inn í eina samanleggingartilgongd av skúlum og kommunum.

Verða kommunurnar lagdar saman, eigur eitt nýtt býráð at taka støðu til ein møguligan nýggjan skúla og staðseting av einum slíkum.

## 13.5. Nýggja kommunan í samstarvinum um Bú- og heimatænastuna

Í sambandi við eina kommunusamanlegging er spurningurin, hvussu verður við samstarvinum í Suðuroynni um bú- og heimatænastuna sera viðkomandi og kann hava stóra ávirkan á avgerðina um at leggja saman ella ikki.

Verða kommunurnar lagdar saman, verður samlaða fólkatalið umleið 2500 íbúgvar. Hetta er ikki nóg mikið til, at kommunan sjálv kann umsita heimatænastu, eldrarøkt v.m. sambært lóg um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Ein av orsøkunum til at leggja kommunur saman í størri eindir er, at kommunurnar skulu verða betri førar fyri at umsita og fíggja uppgávurnar, tær hava. Eftirmetingin av eldraøkinum frá 2021 vísir á, at sum útgangsstøði eigur at verða miðað eftir, at kommunurnar bert fáa uppgávur at røkja, sum tær sjálvar eru mentar at loysa sjálvstøðugt.

Vísandi til gongdina við øktum útreiðslum og framskrivingum av fólkatalinum og aldurssamansetingini, umframt krøvini til eina væl virkandi tænastu á høgum fakligum støði, ivast arbeiðsbólkurin tó stórliga, um tað hevði verið skynsamt, at Bú- og heimatænastan í Suðuroynni varð skipað í tvey øki, heldur enn eitt, sum tað er í dag.

Tað er helst ikki tann loysnin, sum Búskaparráðið vildi mælt til í sambandi við at effektivisera eldrarøktina.

Um Bú- og heimatænastan í Suðuroynni skuldi verið býtt sundur, verður tað helst torførari at veita eina góða tænastu og fjøltáttað tilboð til tey eldru. Harafturat verður tað dýrari fyri bæði kommunurnar í norðaru og sunnaru helvt, tí at deildirnar verða minni orsakað av dupultari leiðslu og fyrisiting.

## *Avbjóðingar í samstarvinum um Bú- og heimatænastuna mugu loysast*

Arbeiðsbólkurin vil vísa á, at tað eru nakrar avbjóðingar í verandi samstarvi um Bú- og heimatænastuna, sum mugu loysast óansæð kommunusamanlegging. Tað eru eisini viðurskifti, sum kunnu viðvirka til, at tær tríggjar kommunurnar ikki fara at leggja saman, um landið ikki tekur neyðug stig til at broyta hesi viðurskifti.

Sum áður sagt, er ongin fíggjarætlan gjørd fyri Bú- og heimatænastuna í Suðuroynni, hóast hetta er eitt lógarkrav. Hetta týðir uppá, at samstarvið ikki virkar, og at stýrið møguliga ikki er virkisført.

Orsøk til hetta er helst verandi valdsbýti, fíggingarleistur og ognarviðurskifti. Hesi verða nærri viðgjørd niðanfyri.

## *Valdsbýti*

Í verandi stýri eru 9 umboð samanlagt. Eitt umboð er fyri hvørja av teimum 7 kommununum, og síðani hava Tvøroyrar og Vágs kommuna tveir limir hvør, tí hesar hava fleiri enn 1000 borgarar.

Tvøroyrar-, Hvalbiar-,og Fámjins kommunur hava samanlagt 4 limir í stýrinum í dag. Samlaðu útreiðslurnar til eldraøkið vóru 65 mió. kr. í 2022. Tær tríggjar kommunurnar í norðaru helvt rindaðu 53% av hesum útreiðslum. Umboðanin í stýrinum er 4 av nýggju limum, t.e. 44%.

Tað vil siga, at samsvar ikki er millum vald og gjald.

Um kommunurnar verða lagdar saman, verða einans 5 kommunur í Suðuroynni.

Nýggja kommunan hevur oman fyri 2000 borgarar, og sostatt fær nýggja kommunan tríggjar limir í stýrið. Tær tríggjar kommunurnar fara sostatt frá at hava 4 limir í stýrinum til at hava tríggjar limir. Kommunurnar í sunnaru helvt koma framhaldandi at hava 5 limir. Ein samanlegging hevði ført við sær, at umboðanin hjá hesum kommunum minkar til tríggjar av átta limum, t.e. 37,5%.

Hetta merkir, at nýggja kommunan verður verri umboðað í stýrinum enn kommunurnar í norðaru helvt eru í dag, og tí hevði ein samanløgd kommuna havt minni ávirkan á, hvussu Bú- og heimatænastan verður skipað, stýrd og hvørjar tænastur verða raðfestar.

Tað kann gera tað verri at fáa stýrið at raðfesta tænastur og at gera íløgur í búpláss í norðaru helvt.

Í eftirmeting av eldraøkinum frá desember 2021 verður víst á, at kommunurnar eru ónøgdar við verandi valdsbýtið í samstørvunum, og at tað eru avbjóðingar við kommunalum samstørvum. Eftirmetingin mælir til at endurskoða, hvussu einstøku kommunurnar verða umboðaðar, her undir eisini at tryggja, at umboðanin verður í samljóði við støddina á kommununum í samstarvinum. Arbeiðsbólkurin metir, at verandi lóggáva kann verða ein forðing fyri samanlegging av teimum trimum kommununum og mælir til, at umboðini í kommunustýrinum umvegis Kommunufelagið staðiliga heita á landsins myndugleikar um at fara undir arbeiðið at fremja hetta tilmælið.

## *Ognarviðurskifti*

Tað er framvegis ikki funnin ein varandi loysn í mun til ognarviðurskiftini á ellis- og røktarheimunum og sambýlunum í Suðuroynni. Hetta eigur at verða gjørt soleiðis, at kommunurnar kunnu gera neyðugar íløgur í fleiri búpláss til eldri borgarar í oynni.

Hvalbiar kommuna eigur eldrasambýlið í Hvalba, og Vágs kommuna eigur eldrasambýlið í Vági.

Kommunurnar í sunnaru helvt tóku stig til at byggja Hamragarð í Vági, men enn er ikki formlig greiða fingin á ognarviðurskiftunum millum land og kommunur. Full semja er ikki, um tað er landið ella kommunurnar í Suðuroynni, sum eiga Suðuroyar ellis- og røktarheim.

Bú- og heimatænastan rindar leigu til Hvalbiar kommunu fyri eldrasambýlið í Hvalba, Vágs kommunu fyri eldrasambýlið í Vági og Porkeris, Hovs, Sumbiar og Vágs kommunu fyri Hamragarð. Ongin leiga verður goldin fyri Suðuroyar ellis- og røktarheim, sum er á Tvøroyri.

Tað er longu bíðilisti eftir búplássum, og tørvurin verður munandi størri komandi árini. Tí verður neyðugt at gera størri íløgur í eldrabústaðartilboð innan fyri rúma tíð, um tørvurin á bútilboðum skal nøktast.

Havandi í huga, at verandi bústaðartilboð, sum eru í norðaru helvt á oynni, helst mugu dagførast soleiðis, at tey eru í tráð við nútímanskrøv frá bæði borgarum og starvsfólkum, og vísandi til tilmælini í álitinum "Í góðum hondum" frá 2022 og tilmælini frá Búskaparráðnum í januar 2024, eiga kommunurnar at umhugsa at gera íløgur í ein størri eldradepil við ymiskum bústaðartilboðum.

## *Fíggingarleistur*

Í eftirmetingini av eldraøkinum verður víst á, at kommunurnar eru ónøgdar við, at fíggjarliga afturberingin ikki svarar til útreiðslurnar, sum kommunurnar hava av eldraøkinum. Her er serliga talan um afturberingina av serskattaskipanum, sum verður borin aftur samsvarandi bústaðnum hjá teimum, sum eru undir skipanini og hevur onki við eldraøkið at gera.

Afturberingin fyri serskattaskipanir hevur verið lækkandi seinastu árini fyri hesar tríggjar kommunurnar. Samstundis fáa nakrar kommunur meira aftur frá landinum enn rindað verður til eldraøkið.

Hetta merkir, at nakrar kommunur brúka part av inntøkunum frá persónsskattinum til at fíggja tænasturnar frá Bú- og heimatænastuni og hava harvið minni fíggjarligt rásarúm at raðfesta aðrar uppgávur, sum kommunurnar hava. Meðan onkur kommuna hevur størri fíggjarligt rásarúm at raðfesta aðrar uppgávur orsakað av afturberingini.

Kommunurnar í Suðuroynni eiga at gera sær greitt, hvussu økti røktartørvurin skal handfarast.

Stóra avbjóðingin liggur ikki einans á útreiðslusíðuni, men avgjørt eisini á inntøkusíðuni.

Tað hevur verið greitt, síðan nýskipanin á eftirlønarøkinum varð framd, at eftirlønarskatturin ikki fer at hækka samsvarandi vøkstrinum í útreiðslunum, og at færri skattgjaldarar skulu rinda fyri hesar øktu útreiðslurnar.

Støða er ikki tikin til, hvussu økið skal fíggjast, nú eftirlønarskatturin ikki fer at hækka í sama mun longur. Viðmerkjast skal tó, at pensjónsaldurin hækkar við ½ ári í ár og aftur við einum ½ ári í 2030, og hevur hetta við sær nakað hægri skattainntøkur.

Haldførisavbjóðingin er ikki nýggj, og hon merkist eisini í dag.

Í nýggjari haldførisfrágreiðing frá januar 2024 vísir Búskaparráðið á, at kommunurnar koma at hava stórar avbjóðingar við at fíggja eldraøkið, og at átøk mugu gerast soleiðis, at eldrarøktin verður effektiviserað.

Minkandi fólkavøksturin í Suðuroynni hevur við sær, at haldførisavbjóðingin rakar meinari í Suðuroynni enn aðrastaðni í landinum.

Bæði kommunu- og landspolitikarar mugu taka hesa avbjóðing í nóg stórum álvara.

Á kommunalum stigi, hevur samstarvið um eldraøkið í Suðuroynni virkað øll árini uttan eina fíggjarætlan. Tað hevur sostatt ikki eydnast kommununum at finna semjur um stutttíðarætlanir. Hinvegin er tað undrunarvert, at tað ikki hevur havt størri avleiðingar fyri kommunurnar, at tær ikki hava havt eina fíggjarætlan, hóast hetta er greitt ásett í lógini. Handfaringin á landspolitiskum stigi hevur sostatt heldur ikki verið nøktandi.

Fíggingarleisturin eigur at verða endurskoðaður, soleiðis at samlaða afturberingin frá landinum hongur saman við borgarum, sum eru 67+. Afturberingin hjá landinum eigur ikki at vera treytað av viðurskiftum, sum ikki hava nakað við útreiðslur á eldraøkinum at gera, eitt nú serskattaskipanir.

Kommunurnar noyðast eisini at gera sítt, til tess at samstarvið kemur at virka. Skal samstarvið virka, er fyritreytin, at vilji til felags loysnir er til staðar. Neyðugt er at síggja eldrarøktina í Suðuroynni sum eina eind og at síggja í eyguni, at eldrarøktin kemur at krevja meira og meira í framtíðini.

Fíggjarætlan skal gerast, og kommunurnar mugu tryggja neyðugt fíggingargrundarlag.

Samanumtikið eru tað nakrar strukturellar avbjóðingar, sum viðvirka til, at samstarvið ikki riggar eins gott og aðrastaðni í landinum. Harumframt mugu kommunurnar vísa vilja til at fáa samstarvið at virka.

## 13.6. Nýggja kommunan í samstarvinum um barnaverndartænastuna í Suðuroy

Samlaða talið av íbúgvum í samanløgdu kommununi verður lægri enn 3000 fólk, og tí verður framhaldandi eitt samstarv fyri alla Suðuroynna eftir samanleggingina. Arbeiðsbólkurin metir ikki, at tað hevði verið skynsamt at skipa økið í tvey barnaverndarøki í Suðuroynni. Talan er um tung mál og viðkvom mál, sum krevja góðar fakligar førleikar. Starvsfólkini, sum í dag starvast í umsitingini eru fakfólk, og ikki hevði verið skynsamt, at havt tvær tílíkar fyrisitingar í Suðuroynni. Harumframt er talan um mál, sum kunnu vera sera kostnaðarmikil.

Ein kommunusamanlegging ávirkar tó umboðanina hjá kommununum í norðari helvt. Í dag hava kommunurnar hvør sítt umboð í bæði samstarvsnevndini og í barnaverndarnevndini, men nýggja kommunan hevði einans fingið eitt umboð. Hesar kommunurnar rinda sostatt oman fyri helvtina av samlaðu útreiðslunum til økið, men hava einans 1 út av 5 umboðum í eini samanlagdari kommunu.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at hesin spurningurin verður tikin upp við landið umvegis Kommunufelag Føroya. Umboðanin í nevndunum eigur í størri mun at endurspegla fólkatalið, soleiðis at betri samsvar er millum vald og gjald.

## 14. Niðurstøða

Arbeiðsbólkurin hevur gjøgnum álitið víst á fyrimunir og vansar við sjálvbodnari kommunusamanlegging.

Lýsingin hevur víst, at fíggjarstøðan í teimum trimum kommununum er rættiliga lík á nógvum økjum. Ein samanlegging hevur við sær, at nettoskuldin pr. íbúgva verður eitt vet hægri fyri borgarar í Tvøroyrar kommunu, men nettoskuldin verður eitt vet lægri fyri borgarar í Hvalba.

Kommunurnar eru tó ymiskar, tá hugt verður eftir skattaprosentunum. Skattaprosentið í Fámjins kommunu er munandi lægri enn í hinum báðum kommununum, og tí eru kommunuskattainntøkurnar pr. íbúgva eisini lægri í Fámjin.

Verða kommunurnar lagdar saman, verður talan um eina fíggjarliga eind við felags skattaprosenti, barnafrádrátti, o.s.fr. Tað verður ein uppgáva hjá nýggja kommunustýrinum at áseta hesi.

Skal kommunuskattainntøkan fyri eina samanlagda kommunu verða tann sama sum í 2022, skal skattaprosentið vera 20,65%.

Um skattaprosentið í eini samanlagdari kommunu verður 20,65%, verður skattaprosentið nærum óbroytt fyri borgarar í Hvalbiar kommunu og eitt vet lægri fyri borgarar í Tvøroyrar kommunu og munandi hægri fyri borgarar í Fámjin.

Nettoskuldin í Fámjin hevur tó verið vaksandi seinastu árini. Hetta kundi bent á, at uttan kommunusamanlegging, verður eisini neyðugt at hækka kommunskattaprosentið í Fámjin, skal kommunan klára at røkja sínar skyldur framyvir.

Nettoskuldin í eini samanlagdari kommunu hevði verið 36,75% av roknaðu inntøkuni í 2022. Ein álíkning hevði tá verið omanfyri 150 mió. kr., og sostatt eru fleiri møguleikar fyri at gera neyðugar íløgur.

Samanumtikið er nýggja kommunan ein sterkari fíggjarlig eind, enn tær tríggjar kommunurnar hvør sær. Hetta er eisini ein eind, sum er betri fyri at lofta teimum stóru avbjóðingunum, sum eru við fólkasamansetingini og fráflytingini í Suðuroynni.

Ein samanlegging kemur tó at merkja eina minni ávirkan í mun til umboðanina bæði í nýggja býráðnum og serliga í samstørvunum um Bú- og heimatænastuna og barnaverndarøkið.

Verður nýggja kommunustýrið samansett við 9 limum, svarar tað til 216 atkvøður fyri hvønn valdan lim. Verður nýggja kommunustýrið mannað við 11 limum svarar tað til 177 atkvøður fyri hvønn valda býráðslim.

Hvør býráðslimur á Tvøroyri svarar til 196 atkvøður í dag. Í Hvalba eru tað 72 atkvøður pr. bygdaráðslim, meðan hvør bygaráðslimur í Fámjin svarar til 24 atkvøður. Hetta merkir samanumtikið at umboðanin verður munandi verri hjá borgarum í Fámjin og Hvalba, meðan borgarin á Tvøroyri verður betri umboðaður um tað verða 11 býráðslimir.

Hinvegin kann tað vera ein fyrimunur hjá borgarunum at hava fleiri umboð at velja millum, og harafturat er møguleiki at styrkja um umboðanina við staðbundnum nevndum.

Størsti vansin við kommunusamanlegging metir arbeiðsbólkurin verða umboðanina í samstørvinum um Bú- og heimatænastuna og barnaverndarøkið. Verandi kommunur rinda meira enn helmingin av útreiðslunum til tænasturnar, men umboðanin í stýrinum er verri enn hjá hinum kommunum í samstørvinum. Ein samanlegging hevur við sær, at umboðanin verður verri – serliga í samstarvinum um barnaverndarøkið, men eisini í Bú- og heimatænastuni.

Ein samanlegging merkir ikki í sjálvum sær, at fyrisitingin verður bíligari ella at størv verða niðurløgd. Hetta veldst um, hvussu fyrisitingin verður skipað og um verandi størv halda fram í nýggju kommununi. Kommunustýrislimirnir verða tó færri í tali, og tað verður bert ein borgarstjóri.

Ein samanlegging hevur við sær at tað verður ein felags kommunu fyrisiting við einum borgarstjóra og einum kommunustjóra. Fyri borgaran á Tvøroyri verða ikki tær stóru broytingarnar, meðan fyri borgarin í Hvalba og Fámjin verður fyrisitingin størri og fjarstøðan størri.

Krøvini til almennar fyrisitingar gerast alsamt størri. Borgarin er vorðin meira tilvitaður um sína rættarstøðu, og seta tí eisini størri krøv til, at umsóknir og klagur verða viðgjørdar sambært galdandi lóggávu. Hetta setir krøv til at fyrisitingin hevur neyðugar fakligar førleikar.

Arbeiðsbólkurin metir tó, at spurningurin um fyrimunir og vansar við sjálvbodnari kommunusamanlegging skal síggjast í einum størri og breiðari samanhangi.

Øll tøl vísa, at Suðuroyggin er í eini truplari støðu, sum bara verður verri, um einki verður gjørt. Greitt er, at landið má gera átøk fyri at loysa framtíðar-avbjóðingar hjá kommununum.

Kommunurnar mugu tó eisini taka ábyrgd av álvarsligu støðuni og gera sítt til at standa í móti avbjóðingunum, sum longu eru og fara at koma.

Við støði í omanfyri lýsta er arbeiðsbólkurin samdur um, at tíðin er komin til at taka stigið og leggja kommunurnar saman.

Ein kommuna verður ein sterkari fíggjarlig- og fyrisitingarlig eind enn tær tríggjar kommunur hvør sær.

Arbeiðsbólkurin ásannar, at valdsbýtið í samstarvinum millum allar kommunurnar í Suðuroynni á eldraøkinum og barnaverndarøkinum verður verri við eini samanlegging og eigur henda avbjóðingin at verða loyst.

Arbeiðsbólkurin vil eisini vísa á, at ein samanlegging loysir ikki allar avbjóðingar í Suðuroynni, men vísir vilja hjá kommununum til at taka neyðug stig og líta frameftir.

## *Arbeiðsbólkurin mælir til fylgjandi:*

- **at avgerðin um at leggja kommunurnar saman verður løgd fyri bý- og bygdaráðini í teimum trimum kommununum sum skjótast, soleiðis at neyðuga fyrireikingartilgongdin kann setast í verk.**
- **at miðað verður eftir, at samanleggingin er framd áðrenn komandi kommunuval, sum er í november í ár.**
- **at eitt ítøkiligt uppskot til sáttmála um sjálvbodna kommunusamanlegging verður gjørt, áðrenn málið verður lagt til fólkaatkvøðu, sum fevnir um fylgjandi viðurskifti:**

    - Heitið á nýggju kommununi
    - Hvussu býráðið verður skipað bæði við tali av limum, nevndum og møguligum staðbundnum nevndum.
    - Hvussu ognarviðurskiftini verða avgreidd
    - Hvussu og hvar umsitingin í nýggju kommununi verður skipað
    - Hvussu starvsfólkaviðurskiftini verða avgreidd í sambandi við samanleggingina
    - Hvussu journalskipan og aðrar skipanir skulu skipast
    - Hvørji atkvøðuøki verða í sambandi við kommunuval
    - Spurningurin um valnevnd má avgreiðast

## *Arbeiðsbólkurin mælir til, at fylgjandi broytingar verða gjørdar uttan mun til kommunusamanlegging:*

- **Umboðanin í stýrinum fyri Bú- og heimatænastuna og barnaverndarøkið eigur at verða tikin upp við landsmyndugleikarnar, so samsvar er millum gjald, fólkatal og vald.**
- **Fíggingarleisturin fyri eldraøkið eigur at takast upp við landsmyndugleikarnar, so kommunurnar megna at veita tænastur og gera neyðugar íløgur framyvir.**
- **Kommunurnar mugu taka neyðug stig til at fáa samstarvið um Bú- og heimatænastuna at virka.**
- **Greiða má fáast á ognarviðurskiftunum í Bú- og heimatænastuni.**
- **Íløgur mugu gerast í fleiri og fjøltáttaðar eldrabústaðir, og atlit mugu takast til at fáa effektivari rakstur.**
- **Skúlarnir í teimum trimum kommunum eiga at verða lagdir saman undir eina leiðslu.**
- **Næmingar í somu árgangum eiga at verða undirvístir saman í verandi skúlum í Hvalba og í Trongisvági**


Hvalbiar
kommuna
Tvøroyrar
kommuna
Fámjins
kommuna

# Bókmentir


Almannamálaráðið (2013). *Tilmæli um eldrapolitikk – Trivnaður, tryggleiki og lívsgóðska.*

Almannamálaráðið (2021). *Eftirmeting av eldraøkinum.*

Almannamálaráðið (2022). *Í góðum hondum. Starvsfólkatørvur á vælferðarøkinum – avbjóðingar og uppskot til loysnir.*

Barna- og útbúgvingarmálaráðið (2023). *Fólkaskúlalógin broytingar. Tilmæli frá arbeiðsbólki.*

Christiansen, P. M. o.o. (1999) *Politik og forvaltning.* Systime.

Eldrabólkurin (2002). *Álit um eldraøkið.*

Holm, D., og Mortensen, B. (2004). *Kommunusamanlegging – hvat siga suðuroyingar?* Arbeiðsrit nr. 7/2004, Granskingardepilin fyri samfelagsmenning.

Holm, D., og Mørkere, J. (2008). *Tilgongd til kommunusamanlegging í Suðuroy.* Arbeiðsrit nr. 19/2008. Granskingardepilin fyri samfelagsmenning.

Jákupsstovu, B. Í o.o. (2008). *Kommunupolitikkur.* Fróðskapur.

Jørgensen,H., Klausen, K., og Gundelach, P. (1997). *Det lokale – Decentral politik og forvaltning.* Aalborg Universitet.

Kommunala umskipanarnevnd (2009). *Kommunur, eindir og uppgávur.*

Kommununevndin (1998). *Frágreiðing um kommunurnar: Nýggj kommunal skipan í Føroyum.*

Kommununevndin (1998). *Nýggj kommunuskipan: Tilmæli og niðurstøður.*

Samferðslumálaráðið (2019). *Álit um møguleikar, fyrimunir og vansar við at gera ein Suðuroyartunnil.*

Skattanevndin (2017). *Lættari, rættari og grønari – uppskot til broytingar í skattaskipanini.*

Vinnumálaráðið (2013). *Heildarætlan fólkaflyting og fólkavøkstur.*

**Arbeiðsbólkur** ***2024***

**SNIÐGEVI:** Pætur Eyðunsson Jensen, DROYM.fo
**PRENT:** FØROYAPRENT

